# LANDSGRANNSKOÐANIN

## Fíggjarárið 2010

Frágreiðing
til løgtingsgrannskoðararnar
um frávik millum játtan og nýtslu

JUNI 2011

# Innihaldsyvirlit


0 FRAMLØGA 7

1 INNGANGUR 9

1.1 SAMANUMTIKIÐ 9
1.2 NEYÐUG BÚSKAPARLIG ATLIT 9
1.3 HØVUÐSTØL 10
1.4 ÓBRÚKTAR LØGUJÁTTANIR 2010 11

2 LØGMANSFYRISITINGIN 13

3 FÍGGJARMÁL 13

3.1 MEIRNÝTSLA 13
3.1.1 LÁN TIL HÚSALÁNSGRUNNIN (STUÐULSJÁTTAN) 3.22.5.01. 13
3.2 MINNINÝTSLA/FRÁVIK 13
3.2.1 TAKS (RAKSTRARJÁTTAN) 3.15.1.04. 13
3.2.2 TÆNASTUMANNAEFTIRLØNIR (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 3.18.1.01. 14
3.2.3 DANSKAR EFTIRLØNIR (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 3.18.2.04. 14
3.2.4 STUÐUL TIL FLUTNING OG DUPULT HÚSARHALD (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 3.21.2.01. 14
3.2.5 STUÐUL TIL RENTUÚTREIÐSLUR (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 3.22.4.01. 14
3.2.6 STUÐUL TIL BYGGING OG UMVÆLING AV EGNUM BÚSTAÐI (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 3.22.4.04. 14
3.2.7 LÆRARAEFTIRLØNIR (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 3.23.2.07. 14
3.3 RENTUR/FRÁVIK 15
3.3.1 RENTUR AV LANDSINS SKULD 20.50.1. 15
3.3.2 MILLUMVERANDI VIÐ TJÓÐBANKAN OG LANDSBANKAN 20.50.2. 15
3.4 INNTØKUR/FRÁVIK 16
3.4.1 SKATTAINNTØKUR 20.52.1. 16
3.4.2 AVGJØLD OG TOLLUR 20.52.2. 17
3.4.3 YMISKAR INNTØKUR 20.52.3. 18
3.4.4 AÐRAR INNTØKUR 20.52.3.10. 18
3.4.5 ENDURRINDAN AV KEYPS-MVG 20.52.5. 18
3.4.6 HEILDARVEITING OT. 20.54.1. 19
3.5 AÐRAR VIÐMERKINGAR 19
3.5.1 ENDURRINDAN AV TÆNASTUMANNAEFTIRLØNUM 19

4 FISKIVINNUMÁL 21

4.1 MEIRNÝTSLA/FRÁVIK 21
4.1.1 GRANSKINGARÆTLANIR (RAKSTRARJÁTTAN) 5.11.1.34. 21
4.1.2 HAVSTOVAN (RAKSTRARJÁTTAN) 5.34.3.01. 21
4.1.3 ÚTLÁN (STUÐULSJÁTTAN) 5.34.5.01. 21
4.2 MINNINÝTSLA/FRÁVIK 22
4.2.1 FISKIMÁLARÁÐIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 5.11.1.05. 22
4.2.2 TILBÚGVING Á LANDI (RAKSTRARJÁTTAN) 5.31.1.01. 22

4.2.3 VEÐURTÆNASTAN (RAKSTRARJÁTTAN) 5.31.1.07. 23
4.2.4 ALMENN JØRÐ, SØLA (LØGUJÁTTAN) 5.33.2.11. 23
4.2.5 LØNJAVNINGARSTOVAN (RAKSTRARJÁTTAN) 5.34.1.10. 23
4.2.6 FISKIVINNUROYNDIR (RAKSTRARJÁTTAN) 5.34.3.07. 24
4.2.7 INNTØKUTRYGD HJÁ FISKIMONNUM (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 5.34.4.01. 24
4.2.8 FLUTNINGSSTUÐUL (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 5.34.4.22. 24
4.2.9 TRYGDARMIÐSTØÐIN (RAKSTRARJÁTTAN) 5.35.1.03. 24
4.2.10 TRYGDARMIÐSTØÐIN (LØGUJÁTTAN) 5.35.1.10. 25

**5 VINNUMÁL 27**

**5.1 MINNINÝTSLA/FRÁVIK 27**
5.1.1 LÁNSAFTURGJALD (STUÐULSJÁTTAN) 6.37.6.01. 27
5.1.2 P/F VÁGA LUFTHAVN, ÚTBYGGING (STUÐULSJÁTTAN) 6.38.2.15. 27
5.1.3 BARSSILSKIPANIN (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 6.39.4.01. 27
**5.2 SERINNTØKUR, VINNUMÁL 56.37.1. 28**

**6 MENTAMÁL 29**

**6.1 MEIRNÝTSLA/FRÁVIK 29**
6.1.1 FÓLKASKÚLIN (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.2.01. 29
6.1.2 SKÚLADEPIL Í SUÐUROY (LØGUJÁTTAN) 7.23.3.06 . 29
6.1.3 SØVN LANDSINS (RAKSTRARJÁTTAN) 7.24.3.05. 29
6.1.4 LÁNSAFTURGJALD (STUÐULSJÁTTAN) 7.24.8.01. 30
**6.2 MINNINÝTSLA/FRÁVIK 31**
6.2.1 PRÓVTØKUR (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.1.31. 31
6.2.2 NÆMINGAHEIM (STUÐULSJÁTTAN) 7.23.1.40. 31
6.2.3 SKÚLADEPIL VIÐ MARKNAGIL (LØGUJÁTTAN) 7.23.3.09. 31
6.2.4 STUDENTASKÚLIN Í HOYDØLUM (LØGUJÁTTAN) 7.23.3.28. 31
6.2.5 MARITIMIR SKÚLAR (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.6.05. 32
6.2.6 LESTRARLÁN (STUÐULSJÁTTAN) 7.23.7.05. 33
6.2.7 SØVN LANDSINS (STUÐULSJÁTTAN) 7.24.3.06. 33
6.2.8 ÍTRÓTTAHØLL Á SANDOYNNI (LØGUJÁTTAN) 7.24.6.13. 34

**7 HEILSUMÁL 35**

**7.1 MEIRNÝTSLA/FRÁVIK 35**
7.1.1 APOTEKSVERKIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 11.20.2.08. 35
7.1.2 SUÐUROYAR SJÚKRAHÚS (RAKSTRARJÁTTAN) 11.20.3.15. 36
7.1.3 GIGNI - HEILSUFRØÐI FYRI BØRN & UNG (RAKSTRARJÁTTAN) 11.21.3.12. 36
**7.2 MINNINÝTSLA/FRÁVIK 37**
7.2.1 HEILSUMÁLARÁÐIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 11.11.1.24. 37
7.2.2 KOPPSETINGAR (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 11.20.1.10. 37
7.2.3 LÆKNAKANNINGAR AV BØRNUM (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 11.20.1.19. 38
7.2.4 HEILSUTRYGD (RAKSTRARJÁTTAN) 11.20.2.02. 38
7.2.5 HEILSUTRYGDARVEITINGAR (RAKSTRARJÁTTAN) 11.20.2.03. 38
7.2.6 KOMMUNULÆKNASKIPANIN (RAKSTRARJÁTTAN) 11.20.2.04. 39

7.2.7 ÚTBÚGVING AV YNGRI LÆKNUM (RAKSTRARJÁTTAN) 11.20.2.05. 39
7.2.8 APOTEKSVERKIÐ (LØGUJÁTTAN) 11.20.2.09. 39
7.2.9 MEDICOTEKNISK TÓL (LØGUJÁTTAN) 11.20.3.06. 39
7.2.10 LANDSSJÚKRAHÚSIÐ, ÚTBYGGING (LØGUJÁTTAN) 11.20.3.08. 40
7.2.11 KLAKSVÍKAR SJÚKRAHÚS (LØGUJÁTTAN) 11.20.3.11. 40

**8 ALMANNAMÁL 41**

**8.1 MINNINÝTSLA/FRÁVIK 41**
8.1.1 ALMANNAMÁLARÁÐIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 12.11.1.26. 41
8.1.2 HJÁLPARTÓLAMIÐSTØÐIN (RAKSTRARJÁTTAN) 12.21.1.07. 41
8.1.3 BARNAVERND (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 12.21.3.01. 42
8.1.4 STUÐUL TIL UPPIHALDSPENING (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 12.21.3.05. 42
8.1.5 BØRN OG UNG (RAKSTRARJÁTTAN) 12.21.3.08. 42
8.1.6 ÆTTLEIÐINGARSTUÐUL (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 12.21.3.13. 43
8.1.7 DAGPENINGASKIPANIN (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 12.21.4.01. 43
8.1.8 SERFORSORG (RAKSTRARJÁTTAN) 12.21.6.01. 44
8.1.9 BÚSTOVNAR O.A. (LØGUJÁTTAN) 12.21.6.02. 46
8.1.10 ANSINGARSAMSÝNING (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 12.21.6.10. 47
8.1.11 VANLIG FORSORG (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 12.21.7.01. 47
8.1.12 FYRITÍÐARPENSJÓN (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 12.21.8.05. 49

**9 INNLENDISMÁL 51**

**9.1 MEIRNÝTSLA/FRÁVIK 51**
9.1.1 LANDSINS OGNIR (RAKSTRARJÁTTAN) 15.11.1.23. 51
9.1.2 HIN FØROYSKI HAPPADRÁTTURIN (RAKSTRARJÁTTAN) 15.14.3.01. 51
9.1.3 AKSTOVAN (RAKSTRARJÁTTAN) 15.38.4.01. 51
**9.2 MINNINÝTSLA/FRÁVIK 52**
9.2.1 INNLENDISMÁLARÁÐIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 15.11.1.39. 52
9.2.2 UMVÆLING AV ALMENNUM BYGNINGUM (LØGUJÁTTAN) 15.11.1.56. 52
9.2.3 YMISKAR ÚTREIÐSLUR (RAKSTRARJÁTTAN) 15.14.1.01. 56
9.2.4 HIN FØROYSKI HAPPADRÁTTURIN - FYRISITING (RAKSTRARJÁTTAN) 15.14.3.04. 57
9.2.5 ORKUMÁL (STUÐULSJÁTTAN) 15.37.4.07. 57
9.2.6 LANDSVERK (RAKSTRARJÁTTAN) 15.38.1.02. 57
9.2.7 NÝGGIR LANDSVEGIR (LØGUJÁTTAN) 15.38.1.07. 58
9.2.8 HAVNIR (LØGUJÁTTAN)15.38.1.14. 58
9.2.9 STUÐUL TIL INFRAKERVIÐ Á ÚTOYGGJUM (STUÐULSJÁTTAN)15.38.1.18. 59

**10 UTTANRÍKISMÁL 61**

**10.1 MINNINÝTSLA 61**
10.1.1 UTTANRÍKISTÆNASTAN (RAKSTRARJÁTTAN) 16.11.1.54. 61
10.1.2 MILLUMTJÓÐA SAMSTARV (STUÐULSJÁTTAN) 16.13.2.04. 61

**11 SAMLAÐ YVIRLIT MEIR-/MINNINÝTSLA 63**

# 0 Framløga

Yvirskipaðu reglurnar um grannskoðan av landsroknskapinum eru ásettar í § 45 í stýrisskipanarlógini. Neyvari reglur eru ásettar í Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 “um grannskoðan av landsroknskapinum vm.” (grannskoðanarlógin).

Sambært § 11, stk. 3, í grannskoðanarlógini skal hvør landsstýrismaður, í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, greiða løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini frá um frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl.

Landsgrannskoðanin hevur gjøgnumgingið tilfarið fyri 2010, og hevur havt samskifti við avvarðandi landsstýrismenn/aðalráð um ymiskar spurningar.

Við hesum letur Landsgrannskoðanin løgtingsgrannskoðarunum frágreiðing um frávik millum játtan og nýtslu fyri árið 2010.

Argir, 21. juni 2011

Beinta Dam,
Landsgrannskoðari

# 1 Inngangur

Í hesari frágreiðing hevur Landsgrannskoðanin fyri hvørt málsøki sær greitt frá um frávik millum játtanartøl og roknskapartøl fyri fíggjarárið 2010. Í frágreiðingini eru eisini viðmerkingar og frágreiðingar frá avvarðandi landsstýrismanni um, hvørjar atvoldirnar eru til frávikini í roknskapinum.

Aftast í frágreiðingini hevur Landsgrannskoðanin sett upp eitt yvirlit, sum vísir meir-ella minninýtslur á øllum høvuðskontum.

## 1.1 Samanumtikið

Gjøgnumgongdin hevur víst, at samanumtikið eru meirnýtslurnar í 2010 færri og minni enn undanfarin ár. Størstu meirnýtslurnar/minniintøkurnar í t.kr. eru:

t.kr.

| Høvuðskonta | | Játtan | Roknskapur | Munur |
|---|---|---|---|---|
| 5.34.5.01. | Útlán (stuðulsjáttan) | -45.000 | -39.459 | 5.541 |
| 6.37.6.01. | Lánsafturgjald (stuðulsjáttan) | -2.500 | -7 | 2.493 |
| 7.23.3.06. | Skúladepil í Suðuroy (løgujáttan) | - | 2.333 | 2.333 |
| 11.20.2.08. | Apoteksverkið (rakstrarjáttan) | 0 | 1.698 | 1.698 |
| 7.23.2.01. | Fólkaskúlin (rakstrarjáttan) | 278.201 | 279.866 | 1.665 |
| 3.22.5.01. | Lán til Húsalánsgrunnin | -1.667 | -278 | 1.389 |
| 7.24.3.05. | Søvn Landsins (rakstrarjáttan) | 22.532 | 23.177 | 645 |
| 7.23.7.04. | Lestrarstuðul (lógarbundin játtan) | 115.257 | 115.898 | 641 |

Í frágreiðingini hava avvarðandi landsstýrismenn greitt frá um frávikini.

At meirnýtslurnar í 2010 ikki eru eins stórar og undanfarin ár, er helst tí, at størri fokus seinastu árini alsamt hevur verið á, hvørt ein landsstýrismaður hevur meirnýtslu á sínum øki.

Eins og vit hava víst á í undanfarnum frágreiðingum, heldur Landsgrannskoðanin tað vera umráðandi, at landsstýrismenn og umsiting eisini hava fokus á, hvat tilfeingið verður brúkt til.

## 1.2 Neyðug búskaparlig atlit

Í § 7 í Ll. nr. 42 frá 4. mai 2009 "um landsins játtanarskipan" er ásett, *at "tá ið veitt játtan verður nýtt, skulu neyðug búskaparlig atlit verða tikin."*

Í roknskaparkunngerðini, sum kom í gildi 1. januar 2007, legði Fíggjarmálaráðið upp til, at aðalráð og stovnar í seinasta lagi 1. januar 2010 skuldu hava sett í verk stýringarmeginreglur um mál og nádd úrslit ot., soleiðis at til ber at lýsa, hvat stovnurin avrikar, og hvussu tilfeingið verður brúkt.

Vísast kann harafturat til Ll. Nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum" har tað í § 4, stk. 3, er ásett, at Løgtingsgrannskoðararnir ma. ansa eftir, *"at tað er*

*hóskandi atborið fíggjarliga í sambandi við umsiting av ognum og viðvíkjandi rakstri av teimum stovnum og tí virksemi, roknskapurin fevnir um.”*

Skyldan at taka neyðug búskaparlig atlit í umsitingini av landsins peningi er galdandi fyri bæði landsstýrismenn og stovnar undir teimum.

## 1.3 Høvuðstøl

Sambært landsroknskapinum eru høvuðstølini fyri fíggjarárið 2010:

mió.kr.

| Landsroknskapurin 2010 | Játtan | Roknskapur |
|---|---|---|
| Inntøkur | 4.713 | 4.726 |
| Útreiðslur | 5.281 | 5.138 |
| Løgur | 168 | 169 |
| **Rakstrar-, løgu- og útlánsúrslit** | **-736** | **-581** |

Til samanberingar hevur Landsgrannskoðanin sett upp roknskapartølini fyri árini 2008-2010 og játtanartølini fyri 2011.

mió.kr.

| | R 2008 | R 2009 | R 2010 | J 2011 |
|---|---|---|---|---|
| Inntøkur | 5.220 | 4.575 | 4.726 | 4.920 |
| Útreiðslur | 5.318 | 5.079 | 5.138 | 5.231 |
| Løgur | 232 | 184 | 169 | 235 |
| **Rakstrar, -løgu og útlánsúrslit** | **-330** | **-688** | **-581** | **-546** |

Í álitinum í Lm.nr. 191/2010 “Uppskot til samtyktar um játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2012” er Fíggjarnevndin samd um, at tann samlaði karmurin árini 2012 – 2015 skal verða:

mió.kr.

| | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 |
|---|---|---|---|---|
| Inntøkur | 4.433 | 4.491 | 4.565 | 4.654 |
| Útreiðslur | 4.563 | 4.511 | 4.435 | 4.379 |
| Løgur | 315 | 315 | 315 | 315 |
| **Rakstrar, -løgu og útlánsúrslit** | **-445** | **-335** | **-185** | **-40** |

Sostatt verður samlaða landskassaundirskotið árini 2008 – 2014 mett at verða 3,15 mia.kr.

## 1.4 Óbrúktar løgujáttanir 2010

Sambært § 13 í Ll. nr. 42 frá 4. mai 2009 "um landsins játtanarskipan" ber ikki til at flyta játtanir til seinni fíggjarár. Í § 22 er tó ásett, at hóast ásetingina í § 13, kann heimild verða givin við átekning at flyta óbrúktar løgujáttanir til seinni fíggjarár.

Í eykajáttanarlógini november 2010 varð í níggju førum við C.átekning veitt heimild at flyta óbrúktar løgujáttanir til seinni fíggjarár.

Á síðu 204 í landsroknskapinum 2010 er hetta yvirlitið yvir avlop á løgujáttanum, sum sambært C.-átekning verður flutt til seinni ár:

| Høvuðskonta | | Kr. |
|---|---|---|
| 5.35.1.10. | Trygdarmiðstøðin | 2.297.279 |
| 7.23.3.09. | Skúladepilin við Marknagil | 2.680.000 |
| 7.24.6.13. | Ítróttarhøll á Sandoynni | 188.000 |
| 11.20.2.09. | Apoteksverkið | 2.255.229 |
| 11.20.3.08. | Landssjúkrahúsið, útbygging | 292.113 |
| 11.20.3.11. | Klaksvíkar sjúkrahús | 1.007.930 |
| 12.21.6.02. | Bústovnar o.a. | 5.500.000 |
| 15.11.1.56. | Umvæling av almennum bygningum | 113.000 |
| **Tilsamans** | | **14.333.551** |

Á síðu 274 í landsroknskapinum 2010 undir "Formlig viðurskifti" hevur Føroya Gjaldstova greitt gjøllari frá roknskaparháttinum, sum er nýttur til tílíkar C.átekningar:

> *"Ónýtta løgujáttanin verður skuldskrivað á standardkontu 35 á stovnsnummarið hjá viðkomandi løgujáttan og góðskrivað (støðlað) á standardkontu 36 á stovnsnummari, sum fevnir um allar ikki brúktar løgujáttanir. Í takt við, at útreiðslur verða hildnar til endamálið, verður ónýtta løgujáttanin góðskrivað viðkomandi løgujáttan, á standardkontu 36 og skuldskrivað standardkontu 35 á stovnsnummarinum, har ikki brúktu løgujáttanirnar verða støðlaðar.*
>
> *Ávirkanin av hesi skráseting av óbrúktari løgujáttan á einstøku løgujáttanina verður tikin við í RLÚ 1, meðan mótbókingin (felags stovnsnummar til allar fluttar løgujáttanir) verður tikin við í RLÚ 2. Samlað hevur henda skráseting av óbrúktum løgujáttanum millum ár tí ikki ávirkan á ársúrslitið.*
>
> *Í einari notu verður greitt frá, hvørjar ikki brúktar løgujáttanir eru støðlaðar, og hvat er brúkt av støðlaðum játtanum í árinum."*

# 2 Løgmansfyrisitingin

Talan er bert er um smávegis frávik.

# 3 Fíggjarmál

## 3.1 Meirnýtsla

Landsstýrismaðurin heldur, at tað samanumtikið er at fegnast um, at 2010 er annað árið á rað uttan meirnýtslu á rakstrinum § 3 "Fíggjarmál", og er tað eisini galdandi fyri nærum allar útreiðslugreinarnar í fíggjarlógini.

### 3.1.1 Lán til Húsalánsgrunnin (stuðulsjáttan) 3.22.5.01.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 1.667 t.kr. til inntøkur. Minniinntøkan er 1.389 t.kr.

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina er talan um lán, ið Húsalánsgrunnurin hevur tikið við heimild í løgtingslóg nr. 28 frá 14. februar 1995, sum var lóg galdandi fyri Húsalánsgrunnin.

Sambært landsstýrismanninum er talan um afturgjald av restskuldini. Á fíggjarlógini 2011 verður ikki roknað við nakrari inntøkujáttan frá lánsafturgjaldi.

## 3.2 Minninýtsla/frávik

### 3.2.1 TAKS (rakstrarjáttan) 3.15.1.04.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 68,7 mió.kr. Minninýtslan er 1,4 mió.kr. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 67,2 mió.kr. Í eykajáttanarlógini august 2010 varð játtanin hækkað 1,5 mió.kr. til arbeiðið við pensjónsnýskipanini.

Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina skuldi eykajáttanin brúkast til 4 høvuðsendamál:

- Lógararbeiði
- Kunning
- Útbygging av dátuskipan
- Innkoyring hjá TAKS

Talan er um eina játtan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 57.280 | 55.843 | -1.437 |
| 24. EDV-skipanir hjá TAKS | 8.250 | 8.102 | -148 |
| 26. Felagsfyrisiting hjá Fíggjarmálaráðnum | 3.193 | 3.399 | 206 |
| **Tilsamans** | **68.723** | **67.344** | **-1.379** |

### 3.2.2 Tænastumannaeftirlønir (lógarbundin játtan) 3.18.1.01.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 21.650 t.kr. Minninýtslan er 435 t.kr. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 20.950 t.kr. Í eykajáttanarlógini mai 2010 varð játtanin hækkað 700 t.kr.

Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina tykist ein persónur at vera dottin burturímillum, tá ið tænastumannalóggávan í 1986-87 varð broytt. Ongin dugir í dag at siga, hví viðkomandi ikki gjørdist tænastumaður tá. Líkindi eru fyri, at hann rættarvegin hevði fingið rætt til tænastumannaeftirløn. Fíggjarmálaráðið hevur tí gjørt semju við hann, so at hann fær tænastumannaeftirløn, sum var hann settur tænastumaður í 1985.

### 3.2.3 Danskar eftirlønir (lógarbundin játtan) 3.18.2.04.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 1.800 t.kr. Minninýtslan er 433 t.kr.

### 3.2.4 Stuðul til flutning og dupult húsarhald (lógarbundin játtan) 3.21.2.01.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 18,5 mió.kr. Minninýtslan er 2,1 mió.kr.

### 3.2.5 Stuðul til rentuútreiðslur (lógarbundin játtan) 3.22.4.01.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 95 mió.kr. netto. Minninýtslan er 2,6 mió.kr. netto. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 99 mió.kr. netto. Í eykajáttanarlógini august 2010 varð skotið upp at lækka játtanina 3 mió.kr. netto.

Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina hevði ein vaksandi partur av sethúsaeigarum fingið lán síni løgd um til bíligari realkredittfígging.

Fíggjarnevndin setti fram broytingaruppskot at lækka játtanina 4 mió.kr. netto, tí landsstýrismaðurin hevði kunnað nevndina um, at til bar at skera 1 mió.kr. afturat av hesari kontu. Broytingaruppskotið varð samtykt, og játtanin varð lækkað 4. mió.kr.

### 3.2.6 Stuðul til bygging og umvæling av egnum bústaði (lógarbundin játtan) 3.22.4.04.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 40 mió.kr. Minninýtslan er 6,3 mió.kr. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 20 mió.kr. Í eykajáttanarlógini mai 2010 varð játtanin hækkað 10 mió.kr. Í eykajáttanarlógini august 2010 varð játtanin aftur hækkað 10 mió.kr.

Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina varð lógin um stuðul til bygging og umvæling av egnum bústaði broytt í 2009 soleiðis, at stuðulin er burtur í 2012. Endamálið við at gera eina skjóta niðurlaðing av stuðlinum var at eggja fólki til at skunda sær við at seta í gongd byggi- og umvælingararbeiði, meðan lágkonjunkturur var.

Landsstýrismaðurin vísir á, at eykajáttanirnar á tilsamans 20 mió.kr. í 2010 eru at kalla útreiðsluneutralar, tí samsvarandi meirinntøka kemur frá hægri meirvirðisgjaldi.

### 3.2.7 Læraraeftirlønir (lógarbundin játtan) 3.23.2.07.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 52,4 mió.kr. Minninýtslan er 1,4 mió.kr. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 52 mió.kr. Í eykajáttanarlógini august 2010 varð skotið upp at hækka játtanina 1 mió.kr. Fíggjarnevndin setti fram broytingaruppskot um bert at

hækka játtanina 0,4 mió.kr. Broytingaruppskotið varð samtykt, og játtanin varð hækkað 0,4 mió.kr.

## 3.3 Rentur/frávik

Talvurnar niðanfyri vísa játtan í fíggjarlóg og roknskapartøl fyri rentuútreiðslur og rentuinntøkur í 2010.

### 3.3.1 Rentur av landsins skuld 20.50.1.

mió.kr.

| | Rentuútreiðslur 20.50.1.01. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|---|
| 01. | Rentur at gjalda | 105,2 | 163,4 | 58,2 |
| | **Tilsamans** | **105,2** | **163,4** | **58,2** |

Á talvuni sæst, at rentuútreiðslur av landsins skuld eru 58,2 mió.kr. hægri, enn mett var.

Í viðmerkingunum til fíggjarlógina stendur:

> *"Langfreistaða skuldin hjá landskassanum var áleið 3,2 mia. kr. við ársenda 2009. Skuldin er samansett av lánsbrævaskuld á áleið 2,7 mia. kr. og skuld til danska statin á 0,5 mia. kr. Skuldin til danska statin er rentu- og avdráttarfrí, og fellur bert til gjaldingar um olja verður funnin í føroysku undirgrundini áðrenn 2018.*
>
> *Tann 1. desember varð mett, at tilsamans verða rentuútreiðslurnar íroknað kursbroytingar av hesari skuld landskassans áleið 209 mió.kr. í 2009. Roknað verður við 105,2 mió.kr. í 2010."*

Sambært landsstýrismanninum er meirnýtslan, at rentuútreiðslurnar, vegna órealiseraðar kursjavningar gjørdust væl hægri, enn mett var. Ætlanin er at broyta uppgerðarháttin, soleiðis at rentuútreiðslurnar bert spegla skuldarstødd og rentustøði. Væntandi verður henda broyting framd til fíggjarlógina fyri 2012.

### 3.3.2 Millumverandi við Tjóðbankan og Landsbankan 20.50.2.

mió.kr.

| | Rentuinntøkur 20.50.2. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|---|
| 01. | Rentuinntøkur av innistandandi: | | | |
| | Rentuinntøkur, og vinningsbýti | 58,2 | 84,9 | 26,7 |
| | Samsýning til Landsbankan | -20,0 | -20,3 | -0,3 |
| | **Rentuinntøkur av innistandandi tilsamans** | **38,2** | **64,6** | **26,4** |
| 04. | Aðrar rentur | 5,0 | 12,1 | 7,1 |
| 07. | Útgoldið yvirskot frá Landsbanka Føroya | 12,0 | 15,4 | 3,4 |
| 10. | Útgoldið yvirskot frá Danmarks Nationalbank | 3,7 | 14,0 | 10,3 |
| | **Tilsamans** | **58,9** | **106,1** | **47,2** |

Undirkonta 01. Rentuinntøkur av innistandandi

Á hesari undirkontu eru meirinntøkurnar 26,4 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum eru meirinntøkurnar, at rentuútreiðslurnar, vegna órealiseraðar kursjavningar, gjørdust væl hægri, enn mett var. Ætlanin er at broyta uppgerðarháttin, soleiðis at rentuútreiðslurnar bert spegla nettoogn og rentustøði. Væntandi verður henda broyting framd til fíggjarlógina fyri 2012.

Undirkonta 04. Aðrar rentur

Á hesari undirkontu eru meirinntøkurnar 7,1 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum er ma. talan um rentuinntøku, 6,6 mió.kr., av láninum til íslendska statin.

## 3.4 Inntøkur/frávik

Talvurnar niðanfyri vísa játtan í fíggjarlóg og roknskapartøl fyri inntøkur í 2010.

### 3.4.1 Skattainntøkur 20.52.1.

mió.kr.

| | Skattainntøkur 20.52.1. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|---|
| 01. | Vanligur landsskattur: | | | |
| | Vanligur lands- og kommunuskattur | 2.625,2 | 2.811,7 | 186,5 |
| | Gamal skattur fyri 1. apríl 1984 | - | 0,1 | 0,1 |
| | Skattainntøka frá FAS-skipanini | 84,8 | 107,2 | 22,4 |
| | Húsaleiguskattur | - | 1,4 | 1,4 |
| | Flutt til kommunur | -1.310,0 | -1.414,0 | -104,0 |
| | **Vanligur landsskattur tilsamans** | **1.400,0** | **1.506,4** | **106,4** |
| 06. | Kolvetnisskattur, persónar | 4,0 | 1,9 | -2,1 |
| 07. | Felagsskattur: | | | |
| | Inntøkur | 157,0 | 146,2 | -10,8 |
| | Flutt til kommunur | -47,0 | -44,3 | 2,7 |
| | **Felagsskattur tilsamans** | **110,0** | **101,9** | **-8,1** |
| 08. | Kolvetnisskattur, feløg | 1,0 | 16,9 | 15,9 |
| 11. | Kapitalvinningsskattur | 105,0 | 78,0 | -27,0 |
| 13. | Avgjald av kapitaleftirlønum | 25,0 | 30,8 | 5,8 |
| 25. | Arvaavgjøld | 5,5 | 3,6 | -1,9 |
| 26. | Gjald til Vinnusjúkragrunnin | | | - |
| | Inntøkur | 7,0 | 7,2 | 0,2 |
| | Flyting til Vinnusjúkragrunnin | -7,0 | -7,2 | -0,2 |
| | **Gjald til Vinnusjúkragrunnin tils.** | **-** | **-** | **-** |
| 27. | Gjald til Heilsutrygd | 104,4 | 104,4 | - |
| 28. | Gjald til Barsilsskipanina | 85,0 | 87,5 | 2,5 |
| 30. | Gjald frá Búnaðarstovuni | 2,8 | 2,8 | - |
| | **Tilsamans** | **1.842,7** | **1.934,2** | **91,5** |

Undirkonta 01. Vanligur landsskattur

Á hesari undirkontu eru meirinntøkurnar 106,4 mió.kr. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 1.380 mió.kr. Í eykajáttanarlógini august 2010 varð játtanin hækkað 20 mió.kr., vísandi til at meirinntøkurnar frá FAS-skipanini vuksu nógv.

Undirkonta 08. Kolvetnisskattur, feløg

Á hesari undirkontu eru meirinntøkurnar 15,9 mió.kr. Talan er um felag, sum hevur skotið nógvan seismikk fyri borisamtak.

Undirkonta 11. Kapitalvinningsskattur

Á hesari undirkontu eru minniinntøkurnar 27 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum var inntøkujáttanin í 2010 helst sett heldur høgt, í mun til at hækkaði kapital-vinningsskatturin í 2009 stavaði frá einum átaki hjá TAKS, sum hækkaði álíkningina við áleið 60 mió.kr.

## 3.4.2 Avgjøld og tollur 20.52.2.

mió.kr.

| | Avgjøld og tollur 20.52.2. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|---|
| 01. | Meirvirðisgjald | | | |
| | Inntøkur, avgjøld | 1.260,0 | 1.337,5 | 77,5 |
| | Útreiðslur,fluttar til kommunur | -90,0 | -155,2 | -65,2 |
| | **Meirvirðisgjald tilsamans** | **1.170,0** | **1.182,3** | **12,3** |
| 04. | Tollavgjald | 30,0 | 31,2 | 1,2 |
| 07. | Punktgjald | 197,0 | 176,9 | -20,1 |
| 10. | Lønhæddargjald | 32,6 | 32,4 | -0,2 |
| 13. | Brennioljugjald | | | |
| | Inntøkur, avgjøld | 74,0 | 73,8 | -0,2 |
| | Útreiðslur,stuðul til vinnu | -12,0 | -10,2 | 1,8 |
| | **Brennioljugjald tilsamans** | **62,0** | **63,6** | **1,6** |
| 16. | Framleiðsluavgjald | 19,0 | 14,4 | -4,6 |
| 19. | Skrásetingargjald | 50,0 | 56,3 | 6,3 |
| 22. | Vegskattur (vektgjald) | 87,0 | 86,7 | -0,3 |
| 25. | Ferðaavgjald | 14,0 | 14,0 | - |
| 28 | Umhvørvisgjald á smyrjiolju | 3,0 | 3,2 | 0,2 |
| 30 | Tinglýsingargjald | 20,0 | 22,5 | 2,5 |
| | **Tilsamans** | **1.684,6** | **1.683,5** | **-1,1** |

Undirkonta 01. Meirvirðisgjald

Á hesari undirkontu eru meirinntøkurnar 12,3 mió.kr. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 1.150 mió.kr. Í eykajáttanarlógini mai 2010 varð játtanin hækkað 10 mió.kr. Í eykajáttanarlógini august 2010 varð játtanin hækkað 10 mió.kr.

Í viðmerkingunum til eykajáttanarlógina august 2010 varð víst á, at stuðulsupphæddin, í sambandi við bygging og umvæling av egnum bústaði, við stórari vissu fór at verða væl hægri enn mett var. Henda hækking fór at hava við sær samsvarandi hækking í MVG-inntøkum.

Undirkonta 07. Punktgjald

Á hesari undirkontu eru minniinntøkurnar 20 mió.kr. Staðfestast kann, at inntøkurnar frá punktgjøldum eru ikki hækkaðar í mun til tey hækkandi avgjøldini seinnu árini. Orsøkirnar kunnu vera ein samanrenning av minkandi eftirspurningi, tí niðurgongd hevur verið í búskapinum, og at "heilsugjøldini" hava veruliga minkað um nýtsluna. Fíggjarmálaráðið ætlar at fáa lýst hesi samanhang betur.

Undirkonta 16. Framleiðsluavgjald

Á hesari undirkontu eru minniinntøkurnar 4,6 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum bleiv inntøkan í 2010 lægri, av tí at avgjaldið frá 1. januar 2010 ikki longur verður avroknað í framleiðsluliðinum, men er flutt til at verða avroknað í søluliðinum, tí at tey føroysku bryggjaríini hava fingið loyvi til fríøki.

### 3.4.3 Ymiskar inntøkur 20.52.3.

mió.kr.

| | Ymiskar inntøkur 20.52.3. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|---|
| 04. | Útluting frá almennum partafeløgum | 8,0 | 6,0 | -2,0 |
| 10. | Aðrar inntøkur | 14,5 | 13,3 | -1,2 |
| | **Tilsamans** | **22,5** | **19,3** | **-3,2** |

Undirkonta 04. Útluting frá almennum partafeløgum

Á hesari undirkontu er talan um vinningsbýti frá P/f FT Samskifti 6,0 mió.kr.

### 3.4.4 Aðrar inntøkur 20.52.3.10.

t.kr.

| | Aðrar inntøkur 20.52.3.10. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|---|
| 02. | Skeinkiloyvi, avgjald | 250 | 65 | -185 |
| 04. | Navnaprógv | 10 | 16 | 6 |
| 05. | Bøtur | 700 | 206 | -494 |
| 07. | Burturlutingargjald | 1.000 | 686 | -314 |
| 09. | Løggilding av el-innleggjarum, avgjald | 300 | 321 | 21 |
| 11. | Víddargjald, oljuvinna | 12.200 | 11.866 | -334 |
| 60. | Óvanligar inntøkur | - | 123 | 123 |
| | **Tilsamans** | **14.460** | **13.283** | **-1.177** |

Største frávikið er "Bøtur", sum er 494 t.kr. lægri, enn mett var. Talan er um fískarí-bøtur, ið verða skrivaðar út við Føroyar.

### 3.4.5 Endurrindan av keyps-MVG 20.52.5.

mió.kr.

| | Endurrindan av keyps-MVG 20.52.5. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|---|
| 01. | Endurrindan av keyps-MVG | 142,5 | 128,8 | -13,7 |
| | **Tilsamans** | **142,5** | **128,8** | **-13,7** |

Á hesari kontu verður alt keyps-MVG'ið miðsavnað.

### 3.4.6 Heildarveiting ot. 20.54.1.

mió.kr.

| | Heildarveiting ot. 20.54.1. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|---|
| 01. | Heildarveiting | 615,5 | 615,5 | - |
| 02. | Endurgjøld | 19,5 | 21,6 | 2,1 |
| | **Tilsamans** | **635,0** | **637,1** | **2,1** |

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2005 umrøddu vit eitt endurgjald, sum danski staturin skuldi rinda viðvíkjandi sjúkrahúsverkinum. Hetta endurgjald er ikki tikið við í roknskapirnar, ma. tí at samskiftistrupulleikar hava verið millum danskar og føroyskar myndugleikar um, hvagar endurgjaldsuppgerðin skal sendast. Talan er um eitt endurgjald fyri tíðina 1. januar 1977 – 31. desember 2004, mett til 3 mió.kr.

Í juni 2009 kunnaði landsstýrismaðurin um, at føroyskir og danskir myndugleikar vóru komnir ásamt um endurgjaldið til 30. juni 2000, og eisini um, hvør danskur myndugleiki skuldi rinda.

Í juni 2010 greiddi landsstýrismaðurin frá, at enn var onki gjald komið frá Personalestyrelsen, og rykt var aftur eftir gjaldinum. Avtalan millum partarnar var, at ikki fyrr enn kravið fram til 30. juni 2000 var fingið á pláss og goldið, skuldi verða farið undir at eftirrokna gjøldini fyri tíðina eftir 30. juni 2000.

Í juni 2011 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at einki er hent síðani juni 2010.

## 3.5 Aðrar viðmerkingar

### 3.5.1 Endurrindan av tænastumannaeftirlønum

Endurrindan frá danska statinum

Í 2010 endurrindaði danski staturin 21,6 mió.kr. fyri læraraeftirlønir. Talan er um tann partin av eftirlønunum, sum tænastumenn hava vunnið sær rætt til, áðrenn teir vórðu yvirtiknir. Hetta endurgjald verður tikið við í roknskapin undir § 20 “Inntøkur” undir málsøkinum “Heildarveiting ot.”, høvuðskonta 20.54.1.01.

Í øðrum førum verða endurgjøld fyri eftirlønir bókað á teimum kontum, har eftirlønin er útreiðsluførd, td. verða endurgjøld fyri eftirlønir til fyrrverandi starvsfólk undir Serforsorgini bókað sum negativ útreiðsla undir høvuðskontu “3.18.1.01. Tænastumannaeftirlønir.”

Í 2009 reisti Landsgrannskoðanin spurningin, hví endurgjøldini fyri eftirlønarútreiðslur verða bókað ymiskt.

Í juni 2010 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Fíggjarmálaráðið fór at taka støðu til, um endurrindanin av tænastumannaeftirlønum skuldi verða flutt undir høvuðskonturnar, har útreiðslurnar av hesum tænastumannaeftirlønum verða hildnar, tað er serliga undir høvuðskontuni “Læraraeftirlønir” undir § 3 “Fíggjarmál”.

Í fíggjarlógini 2011 eru allar eftirlønir savnaðar undir høvuðskontunum á § 3 “Fíggjarmál”.

# 4 Fiskivinnumál

## 4.1 Meirnýtsla/frávik

### 4.1.1 Granskingarætlanir (rakstrarjáttan) 5.11.1.34.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 2.785 t.kr. Meirnýtslan er 209 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum vórðu tvey størv niðurløgd av sparingum, og játtanin til Granskingarætlanir fyri 2011 varð strikað. Tískil mátti peningur til uppsagnarløn og frítíðarpening fyri 2011 verða settur av í 2010.

### 4.1.2 Havstovan (rakstrarjáttan) 5.34.3.01.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 11.957 t.kr. netto. Meirnýtslan er 192 t.kr. netto.

Talan er um eina játtan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---:|---:|---:|
| 20. Vanligt virksemi | 10.692 | 10.993 | 301 |
| 22. Ferðing og atburður hjá toski | 514 | 559 | 45 |
| 23. Fuglakanningarstøð | 539 | 592 | 53 |
| 24. Varðveitan av fjølbroyttum flota | 212 | - | -212 |
| 40. Inntøkufíggjað virksemi | - | 2 | 2 |
| 45. Verkætlanir | - | 3 | 3 |
| **Tilsamans** | **11.957** | **12.149** | **192** |

Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 11.557 t.kr. netto. Í eykajáttanarlógini august 2010 varð játtanin hækkað 400 t.kr. vísandi til, at Havstovan hevði ikki fingið tær inntøkur, sum roknað var við, umframt at nakrar óvæntaðar rokningar vóru staðfestar.

Sambært landsstýrismanninum kemst meirnýtslan av, at Havstovan hevur avskrivað gamlar verkætlanir við góðum 300 t.kr

### 4.1.3 Útlán (stuðulsjáttan) 5.34.5.01.

Í fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 51.500 t.kr. og ein útreiðslujáttan 6.500 t.kr. Sambært landsroknskapinum eru inntøkurnar 71.094 t.kr. og útreiðslurnar 31.635 t.kr.

t.kr.

| Lán, effektiv veðhald ot. 5.34.5.01. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---:|---:|---:|
| 01. Útlán, inntøkur | -51.500 | -71.094 | -19.594 |
| 01. Útlán, útreiðslur | 6.500 | 31.635 | 25.135 |
| **Tilsamans** | **-45.000** | **-39.459** | **5.541** |

Talan er um afturgjøld og eftirgeving av lánum, ið eru veitt fiskivinnuni við heimild í Ll. nr. 102/1988 "um endurnýgging av fiskiskipaflotanum" vsb.

Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 6.500 t.kr. til útreiðslur og 9.000 t.kr. til inntøkur. Í eykajáttanarlógini november 2010 varð inntøkujáttanin hækkað 42.500 t.kr.

Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina verða gjaldførislánini, sum vórðu lænt út til Realkreditt Føroya, goldin landskassanum aftur pr. 31. desember 2010.

Fyri at lýsa, hvussu bókingarmannagongdin er, vil Landsgrannskoðanin vísa til síðu 272 í landsroknskapinum 2010, har tað undir "formlig viðurskifti" stendur, at útlán verða viðgjørd í rakstrarroknskapinum eftir hesum meginreglum:

- tá ið lán verða veitt (útgoldin), verða tey skrásett sum útreiðsla í rakstrarroknskapinum, á standardkontu 82.
- avsett verður ikki móti tapi á rakstrarroknskapinum, tí lánið er longu tikið við sum útreiðsla.
- verða lán síðani avskrivað, verður avskrivingin bókað bæði sum inntøka og útreiðsla í rakstrarroknskapinum við somu upphædd, ávikavist á standardkontu 52/53 og 86.

## 4.2 Minninýtsla/frávik

### 4.2.1 Fiskimálaráðið (rakstrarjáttan) 5.11.1.05.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 14.668 t.kr. Minninýtslan er 579 t.kr.

Talan er um eina játtan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 13.568 | 13.804 | 236 |
| 23. EDV-verkætlan | 1.100 | 285 | -815 |
| **Tilsamans** | **14.668** | **14.089** | **-579** |

### 4.2.2 Tilbúgving á landi (rakstrarjáttan) 5.31.1.01.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 15.960 t.kr. Minninýtslan er 1.637 t.kr.

Talan er um eina játtan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Tilbúgvingarsamskipanin | 3.014 | 1.685 | -1.329 |
| 21. Brunaumsjón Landsin | 2.181 | 2.146 | -35 |
| 22. Neyð- og trygdartænasta (Tórshavn Radio) | 5.230 | 5.397 | 167 |
| 23. Sjóbjargingarstøðin | 5.535 | 5.095 | -440 |
| **Tilsamans** | **15.960** | **14.323** | **-1.637** |

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at í 2009 varð ein útreiðslumeting gjørd fyri tær ymisku eindirnar í tilbúgvingini. Metingin staðfesti, at fíggjartørvurin var størri enn játtanin var.

Seint í 2009 varð tí gjørt av at skerja/niðurleggja partar av virkseminum í tilbúgvingarsamskipanini, so hædd varð tikin fyri útreiðsluøking aðrastaðni.

Roknskapurin fyri 2010 staðfestir tó, at metta útreiðsluøkingin ikki varð ein partur av rakstrinum fyri 2010. Orsøkirnar eru tvinnar:

- ymiskar rakstrarútreiðslur vórðu í 2010 lægri, enn mett var í 2009, og
- aðrar rakstrarútreiðslur vórðu útsettar til 2011.

Umsitingin innan kjarnorkutilbúgving er ein natúrligur táttur innan økið. Hendan umsiting varð í 2010 fyribils løgd niður, men verður virkin og ment aftur í 2011.

Umboð fyri deildirnar í tilbúgvingini samráddust í 2009 um ymisk leigugjøld. Kostnaðurin fyri hesi gjøld gjørdist nakað lægri í 2010, enn mett var í 2009, samstundis sum ein serinntøka av leigu varð bókað í rakstrinum 2010. Annars vórðu útreiðslurnar í 2010 lágar við atliti at vaktarskipanum, sjúkradøgum og innkeypi til viðlíkahald.

### 4.2.3 **Veðurtænastan** (rakstrarjáttan) 5.31.1.07.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 4.740 t.kr. Minninýtslan er 134 t.kr.

Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 3.710 t.kr. Í eykajáttanarlógini mai 2010 varð skotið upp at hækka játtanina 1.600 t.kr. vísandi til, at sáttmáli var undirskrivaður við DMI[1] um, at landsstýrið skuldi rinda 1.587 t.kr. árliga fyri tænasturnar frá DMI.

Í álitinum frá Fíggjarnevndini varð skotið upp at strika eykajáttanina vísandi til meginregluna um útreiðsluneutralitet. Fíggjarnevndin setti samsvarandi fram broytingaruppskot, ið varð samtykt, og játtanin varð tí ikki hækkað.

Í eykajáttanarlógini august 2010 varð játtanin hækkað 1.030 t.kr. Í viðmerkingunum til eykajáttanarlógina varð ma. greitt frá, at sáttmáli nú var undirskrivaður við DMI, og staðfest var, at landsstýrið skuldi rinda 1.587 t.kr. árliga fyri tænasturnar frá DMI. Árligi tørvurin fyri at reka Veðurstøðina verður sostatt um 5,3 mió.kr.

Av tí at útsett varð at keypa tilfar, og sparingar annars vórðu framdar, varð tørvurin í 2010 um 4,7 mió.kr.

Landsstýrismaðurin hevur víst á, at eykajáttanarlógin august 2010 varð endaliga samtykt 20. oktober 2010, og lýst 29. oktober 2010. Tá var so langt liðið út á árið, at stundir og veðurlíkindi vórðu ikki at avgreiða viðlíkahaldsarbeiðið.

### 4.2.4 **Almenn jørð, søla** (løgujáttan) 5.33.2.11.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 0 kr. netto, 10 mió.kr. til útreiðslur og 10 mió.kr. til inntøkur. Sambært landsroknskapinum 2010 eru útreiðslurnar 4,4 mió.kr. og inntøkurnar 4,4 mió.kr.

### 4.2.5 **Lønjavningarstovan** (rakstrarjáttan) 5.34.1.10.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 2.872 t.kr. Minninýtslan er 381 t.kr.

---

[1] Danmarks Meteorologiske Institut

Landsstýrismaðurin kunnar um, at í mai 2009 varð nevnd sett at endurskoða skipanina við inntøkutrygd, og við hesum í huga varð hildið aftur við KT-menning. Eisini var eitt starv ósett part av árinum.

### 4.2.6 **Fiskivinnuroyndir** (rakstrarjáttan) 5.34.3.07.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 5.008 t.kr. Minninýtslan er 633 t.kr.

### 4.2.7 **Inntøkutrygd hjá fiskimonnum** (lógarbundin játtan) 5.34.4.01.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 25 mió.kr. Minninýtslan er 4,4 mió.kr. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 42 mió.kr. Í eykajáttanarlógini mai 2010 varð játtanin lækkað 12 mió.kr. Í eykajáttanarlógini august 2010 varð játtanin lækkað 5 mió.kr.

Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina mai 2010 varð mett, at nýtslan í 2010 fór at verða 30 mió.kr.

Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina august 2010 sá tað út til, at gongdin í fiskivinnuni var vend. Tí fór ikki at verða brúk fyri meira enn um 25 mió.kr. til Inntøkutrygd í 2010.

Sambært landsstýrismanninum er altíð sera torført at meta um tørvin á játtan, tí at so nógvir faktorar eru ókendir, so sum fiskiskapur, veður, fiskaprísir og kostnaðir. Í august 2010 kundi hómast ein positiv vend, og hon hevði við sær eina minninýtslu, góðar 4 mió.kr.

### 4.2.8 **Flutningsstuðul** (lógarbundin játtan) 5.34.4.22.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 3.200 t.kr. Minninýtslan er 767 t.kr.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at fleiri virkir vórðu latin aftur, og tí var minni flutningur. Tað gav eina sparing, góðar 700 t.kr.

### 4.2.9 **Trygdarmiðstøðin** (rakstrarjáttan) 5.35.1.03.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 2.459 t.kr. netto. Minninýtslan er 127 t.kr. netto. Í fíggjarlógini eru játtaðar 4.179 t.kr. til útreiðslur og 1.720 t.kr. til inntøkur. Sambært landsroknskapinum eru útreiðslurnar 4.582 t.kr. og inntøkurnar 2.250 t.kr.

t.kr.

| Trygdarmiðstøðin 5.35.1.03. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Útreiðslur | 4.179 | 4.582 | 403 |
| Inntøkur | -1.720 | -2.250 | -530 |
| **Tilsamans** | **2.459** | **2.332** | **-127** |

Landsstýrismaðurin vísir á, at prísurin á Trygdarskeiðum varð settur upp til 4.500 kr. í januar 2010. Tað hevði við sær eina hækking í inntøkuni, men ikki so nógv sum væntað, av tí at næmingatalið var lægri. Útreiðslurnar hækkaðu nógv av umleggingum og flytan í nýggj hølir.

### 4.2.10 Trygdarmiðstøðin (løgujáttan) 5.35.1.10.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 12.700 t.kr. Sambært landsroknskapinum er øll játtanin nýtt. Í veruleikanum er ein minninýtsla 2.297 t.kr., sum við heimild í C.átekningini í eykajáttanarlógini november 2010 er flutt til seinni fíggjarár

Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 8 mió.kr. Í eykajáttanarlógini august 2010 varð játtanin hækkað 4,7 mió.kr., at nýta til:

- tríggjar skúlastovur,
- auditorium/matarsal,
- vindeygu, og
- starvsfólkarúm/skrivstovur.

# 5 Vinnumál

## 5.1 Minninýtsla/frávik

### 5.1.1 Lánsafturgjald (stuðulsjáttan) 6.37.6.01.

Í fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 2.500 t.kr. Minniinntøkan er 2.493 t.kr.

Talan er um afturgjaldan av lánum, sum Íløgugrunnurin, Grunnur Ferðavinnunnar og Grunnurin til ídnaðarfremjandi endamál í sínari tíð hava latið. TAKS umsitur innkrevjingina av falnu skuldini, meðan Gjaldstovan tekur sær av ma. at bóka inngjøld og rentutilskrivingar.

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í juni 2010 greiddu vit frá, at sambært TAKS hava krøvini verið fyri í Fútarættinum í 2006/2007, har skuldararnir søgdu seg vera insolventar. TAKS ger tí einki fyri at krevja inn falnu skuldina, tí tað tænir ongum endamáli, tá ið skuldararnir eru insolventir.

Vinnumálaráðið kannaði í 2010, um nakað felag, sum hevði fingið lán, og sum stóð at skylda pening, var strikað. Eitt felag var strikað (tvingsilsavtikið), og skuldin hjá hesum felag varð strikað/avskrivað í februar 2010.

Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2011 er inntøkan sett til 0 kr, av tí at tað er sera óvist, um nakað lánsafturgjald verður.

Landsstýrismaðurin hevur í mai 2011 kunnað um, at TAKS fyri nøkrum árum síðani hevði tey flestu málini í Fútarættinum, men øll endaðu úrslitaleys. Sambært TAKS hava málini enn rættargildi, og tey verða tikin upp aftur, tá ið hildið verður, at tað gevur meining.

### 5.1.2 P/F Vága Lufthavn, útbygging (stuðulsjáttan) 6.38.2.15.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 200 mió.kr. til útreiðslur og 200 mió.kr. til inntøkur. Ongin útreiðsla ella inntøka er bókað.

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina er endamálið við játtanini, at fáa fíggjarliga heimild til at hækka partapeningin í P/F Vága floghavn. Hækkaði partapeningurin skal nýtast til at fíggja útbyggingarnar. Íleggingargrunnurin fyri Føroyar verður niðurkapitaliseraður við tilsamans 365 mió.kr. til tess at fíggja íløgurnar.

Talan er um eina útreiðsluneutrala játtan, tí inntøkurnar frá Íleggingargrunninum fíggja útreiðslur landskassans. Partabrøv felagsins verða ogn landsins.

Í fíggjarlógini 2011 er játtanin endurtikin.

### 5.1.3 Barssilskipanin (lógarbundin játtan) 6.39.4.01.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 89 mió.kr. Minninýtslan er 8,8 mió.kr.

Landsstýrismaðurin vísir á, at játtanin til Barsilsskipanina er bygd á eina meting. Fleiri óvissur eru knýttar at hesari meting:

- tal á føðingum/ættleiðingum,
- tal á umsóknum,

- freistin at søkja (søkt skal verða í seinasta lagi 6 mðr. eftir føðing),
- inntøkur hjá mammum og pápum,
- tal á pápum, sum søkja um barsilsfarloyvi.

Tað, sum ger metingina serliga trupla, er, at seinasta freist at søkja um barsilspening í 2010 er í juni 2011 - hetta er fyri føðingar í desember 2010.

Samanumtikið vísir landsstýrismaðurin á, at hetta eru alt truplar metingar, og flestu teirra hevur Vinnumálaráðið onga ávirkan á.

Landsstýrismaðurin leggur afturat, at gongdin seinastu árini hevur verið, at talið á føddum børnum er fallandi, tó hava lønarhækkingar gjørt, at minkingin í barnsburðum ikki lutalsliga hevur ávirkað útgjøldini.

## 5.2 Serinntøkur, vinnumál 56.37.1.

mió.kr.

| | | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|---|
| 26. | P/F Føroya Lívstrygging, søla av partabrøvum | -32,5 | - | 32,5 |
| 28. | P/F Føroya Lívstrygging, avhendan av partabrøvum | | | |
| | 54. Stuðul til annað virksemi | 32.5 | - | -32,5 |
| | 85. Søla av virðisbrøvum | -32,5 | - | 32,5 |
| | **Avhendan tilsamans** | **-** | **-** | **-** |
| | **Tilsamans** | **-32,5** | **-** | **32,5** |

Í fíggjarlógini er ongin játtan. Í eykajáttanarlógini oktober 2010 vórðu játtaðar 32,5 mió.kr. til inntøkur. Endamálið við játtanini var at fáa fíggjarliga heimild til:

*at* selja 50% av partapeninginum í P/F Føroya Lívstrygging, og

*at* lata 50% av partapeninginum hjá P/F Føroya Lívstrygging til Ognarfelagið Lív.

Sambært § 1 í løgtingslóg nr. 59 frá 16. mai 2006 "um at einskilja P/F Føroya Lívstrygging", hevur landsstýrismaðurin materiella heimild at selja 50% av partapeninginum og lata hini 50% til Ognarfelagið Lív.

Partapeningurin varð hvørki seldur ella avhendaður í 2010. Í fíggjarlógini 2011 er játtanin endurtikin.

Í mai 2011 keypti BankNordik helmingin av partabrøvunum í Føroya Lívstrygging fyri 35 mió.kr. Keypið er tó treytað av, at kappingarmyndugleikarnir góðtaka handilin, og at ein ávís umskipan av felagnum fer fram, fyri at tryggja handfaringina av veðhaldinum frá landskassanum. Væntandi tekur BankNordik við helminginum av partabrøvunum í P/F Føroya Lívstrygging á heysti 2011.

# 6 Mentamál

## 6.1 Meirnýtsla/frávik

### 6.1.1 Fólkaskúlin (rakstrarjáttan) 7.23.2.01.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 278,2 mió.kr. Meirnýtslan er 1,7 mió.kr. Farið er upp um lønarkarmin við 1,8 mió.kr. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 276,2 mió.kr. Í eykajáttanarlógini november 2010 varð játtanin hækkað 2 mió.kr.

Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina fór játtanin ikki at halda, hóast stórar sparingar vóru settar í verk.

Sambært landsstýrismanninum góvu sparingarnar, ið vórðu settar í verk heysthálvuna 2010, ikki tað, sum væntað var, og lønahækkingingin, 700 t.kr., var ikki samtykt, tá ið Mentamálaráðið sendi Fíggjarmálaráðnum umbønina.

### 6.1.2 Skúladepil í Suðuroy (løgujáttan) 7.23.3.06 .

Í fíggjarlógini er eingin játtan. Útreiðslurnar eru 2.333 t.kr. netto.

t.kr.

| Skúladepil í Suðuroy 7.23.3.06. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| **Inntøkur:** | | | |
| Vørusøla | - | -1.036 | -1.036 |
| Afturførd avseting | - | -2.215 | -2.215 |
| **Inntøkur tilsamans** | **-** | **-3.251** | **-3.251** |
| **Útreiðslur:** | | | |
| Løguútreiðslur | - | 5.584 | 5.584 |
| **Útreiðslur tilsamans** | **-** | **5.584** | **5.584** |
| **Tilsamans** | **-** | **2.333** | **2.333** |

Sambært landsstýrismanninum er talan um byggiútreiðslur, sum áttu at verið bókaðar á løgujáttanina. Roknskaparliga vórðu hesar útreiðslur av órøttum mótroknaðar á kontu í fíggjarstøðuni, har aðrar væntaðar útreiðslur og reist krøv vórðu støðlað við fíggjarárslok 2008, ma. tær 8.785 t.kr., sum vórðu settar av til at rinda eitt møguligt krav frá byggitakaranum MT Højgaard.

Landsstýrismaðurin kunnar um, at sambært Landsverk er talan um útreiðslur, ið viðvíkja hesari verkætlan, og sum neyvan slapst undan at rinda. Harafturat vóru fleiri av útreiðslunum neyðugar at rinda, fyri at skúlin kundi verða tikin í nýtslu. Landsverk vísir eisini á, at fleiri av hesum útreiðslum áttu at verið støðlaðar og skrásettar í landsroknskapinum longu í 2008, og tá staðfestar sum meirnýtsla.

Landsstýrismaðurin vísir á, at í svari til § 52a fyrispurning nr. 18/2009, 25. oktober 2010, er Løgtingið gjøllari kunnað um hesi viðurskifti, har ein frágreiðing frá Landsverk 22. oktober 2010 eisini er endurgivin.

### 6.1.3 Søvn Landsins (rakstrarjáttan) 7.24.3.05.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 22.532 t.kr. Meirnýtslan er 645 t.kr. Talan er um eina játtan, sum hevur hesar undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Føroya landsbókasavn | 5.992 | 6.806 | 814 |
| 21. Føroya Landsskjalasavn | 2.817 | 3.126 | 309 |
| 22. Føroya Fornminnasavn | 7.241 | 7.088 | -153 |
| 23. Føroya náttúrugripasavn | 3.248 | 3.261 | 13 |
| 24. Havlívfrøðiliga royndarstøðin | 1.655 | 1.763 | 108 |
| 26. Menning av mentanararvinum | 357 | 524 | 167 |
| 27. Friðað hús og fornminni | 1.222 | 1.027 | -195 |
| 41. Inntøkufíggjað virksemi, Før. Landsskjalasavn | - | -309 | -309 |
| 44. Inntøkufíggjað virksemi, Havfrøðiliga Royndarstøðin | - | -109 | -109 |
| **Tilsamans** | **22.532** | **23.177** | **645** |

Sambært landsstýrismanninum hevur játtanin til Landsbókasavnið undanfarin ár fevnt bæði um rakstur av Landsbókasavninum og um stuðulsjáttanina til fólka- og skúlabókasøvn.

I 2010 er uppsetanin í løgtingsfíggjarlógini av játtanini til Landsbókasavnið broytt. Rakstrarjáttanin er nú ein høvuðskonta fyri seg, og stuðulsjáttanin er ein onnur høvuðskonta. Av misgáum er rakstrarjáttanin ikki hækkað við teirri upphædd, ið undanfarin ár hevur verið fíggjað av stuðulsrakstrinum.

Varð mannagongdin ikki broytt í 2010, hevði talan verið um eina minninýtslu, netto, tí samlaða rakstrarjáttanin til Landsbókasavnið og hini søvnini vísir eina meirnýtslu 645 t.kr. netto, og samlaða stuðulsjáttanin eina minninýtslu 1.549 t.kr. Stig eru tikin í 2011 til at bøta um henda skeivleika.

### 6.1.4 Lánsafturgjald (stuðulsjáttan) 7.24.8.01.

Í fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 100 t.kr. Ongin inntøka er skrásett í landsroknskapinum.

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina er talan um lánsupphæddir, sum verða goldnar aftur frá kommunum og ítróttafeløgum í sambandi við lántøku til at byggja ítróttaanlegg.

Í juni 2009 greiddi Landsstýrismaðurin frá, at talan var um eitt lán til Tofta Ítróttafelag. Føroya Gjaldstova hevði boðað frá, at lánið var til innheintingar. Í mai 2010 kunnaði landsstýrismaðurin um, at skylduga upphæddin ikki enn var heintað inn, og at TAKS arbeiddi við málinum.

Landsstýrismaðurin kunnar um, at Taks hevur greitt frá, at onki nýtt er í málinum. Tofta Ítróttarfelag klárar, sum er, ikki at rinda, men tey royna at fáa upphæddina inn, og so leingi felagið er til, er møguligt at fáa peningin inn fyrr ella seinni

## 6.2 Minninýtsla/frávik

### 6.2.1 Próvtøkur (rakstrarjáttan) 7.23.1.31.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 8.526 t.kr. Minninýtslan er 270 t.kr. Sambært landsstýrismanninum kemst minninýtslan í høvuðsheitum av, at færri sjúkraroyndir vóru í 2010 enn vanlig ár.

### 6.2.2 Næmingaheim (stuðulsjáttan) 7.23.1.40.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 223 t.kr. Minninýtslan er 117 t.kr. Sambært landsstýrismanninum hevur Bústovnur føroyinga ikki rindað rentur og avdráttir av lánum í Eik, og hevur tí ikki fingið stuðul. Harafturat er eitt lán hjá Studentaskúlaheiminum útgoldið, og stuðulin er tí samsvarandi lækkaður.

### 6.2.3 Skúladepil við Marknagil (løgujáttan) 7.23.3.09.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 23.000 t.kr. Sambært landsroknskapinum er øll játtanin nýtt. Í veruleikanum er ein minninýtsla, 2.680 t.kr., sum við heimild í C.átekningini í eykajáttanarlógini november 2010 er flutt til seinni fíggjarár

### 6.2.4 Studentaskúlin í Hoydølum (løgujáttan) 7.23.3.28.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 3.700 t.kr. til løguarbeiði í sambandi við krøv frá Brunaumsjón Landsins og Arbeiðseftirlitinum. Øll játtanin er nýtt.

Harumframt eru á høvuðskontu 7.23.3.05. "Miðnámsútbúgvingar" bókaðar kr. 1.067.273 í umvælingar- og viðlíkahaldsútreiðslum hjá Studentaskúlanum í Hoydølum:

- kr. 677.257 á undirkontu 21. "Føroya Studentaskúli og HF-skeið",
- kr. 390.016 á undirkontu 28. "Felags fyri miðnámsskúlar".[2]

Á høvuðskontu 15.11.1.56. "Umvæling av almennum bygningum (løgujáttan)" undir Innlendismálaráðnum eru bókaðar kr. 1.719.360 til umvælingar á Studentaskúlanum í Hoydølum.

Samlaðu umvælingar- og viðlíkahaldsútreiðslurnar hjá Studentaskúlanum í Hoydølum í 2010 eru sostatt kr. 6.486.416, sum víst niðanfyri:

kr.

| Høvuðskonta | Roknskapur |
|---|---|
| 7.23.3.28. Studentaskúlin í Hoydølum (løgujáttan) | 3.699.783 |
| 7.23.3.05. Miðnámsútbúgvingar (rakstrarjáttan) | 1.067.273 |
| 15.11.1.56 Umvæling av almennum bygningum (løgujáttan). | 1.719.360 |
| **Tilsamans** | **6.486.416** |

Landsgrannskoðanin spurdi, hví útreiðslurnar til umvælingar á Studentaskúlanum í Hoydølum eru bókaðar á fleiri høvuðskontur, tá ið serskild løgujáttan til endamáli er í fíggjarlógini. Landsstýrismaðurin hevur hesa frágreiðing:

[2] Útreiðslurnar eru bókaðar undir standardkontu 14, á StRk 1469 "Keyp av vørum annars"

*"Fyrst kann nevnast, at fleiri orsøkir eru til stóru útreiðslurnar í 2010. Gamla dreingjakostdeildin varð stongd fyri undirvísing á vári 2010, og nýggj lon við 10 skúlastovum varð bygd sunnan fyri skúlan, og var liðug til skúlaársbyrjan 2010.*

*Harumframt vórðu umfatandi umvælingar framdar í høvuðsbygninginum. Tríggjar skúlastovur afturat fingu ísettar luftskiftisskipanir, og fleiri ábøtur eru gjørdar á gólv, veggir og hurðar kring um á skúlanum, har trupulleikar hava verið við fukti og harvið eisini vandi fyri soppi. Týdningarmest er tó, at eitt 800 fermetra stórt kjallaraøki, ið vísti seg at vera illa fongt við soppi, varð ruddað og reinsað, samstundis sum tað við tettingum og luftsúgvingarskipanum er byrgt upp fyri, at dálkað luft úr hesum øki gýsur upp gjøgnum skúlan.*

*Síðani varð høvuðsbygningurin allur, sum hann er, vaskaður við soppadrepandi evni. Nógv fólk, bæði handverkarar, starvsfólk og reingerðarfólk vóru til arbeiðis á skúlanum alla summarfrítíðina fyri at fáa nýggja bygningin og ábøturnar í høvuðsbygninginum lidnar til tíðina. Ongin tíð var at umráða seg, og fyri at kunna seta hesi bráðneyðugu tiltøkini í verk, so skúlin kundi lata uppaftur, varð gjørt av at tálma aðrar útreiðslur á studentaskúlanum, soleiðis at eyka viðlíkahaldsútreiðslurnar kundu haldast innanfyri løgujáttanina, játtanina til felags viðlíkahald og miðnámsskúlajáttanina.*

*Á fíggjarlógini er ein løgujáttan til studentaskúlan í Hoydølum, sum í 2010 varð ætlað til krøv frá Brunaumsjón Landsins og Arbeiðseftirlitinum. Men viðmerkt verður, at umframt løgujáttanina vórðu í 2009 nýttar uml. 1 mió.kr. av felags viðlíkahaldsjáttanini hjá landinum. Sostatt er tingið óbeinleiðis kunnað um, at um á stendur, verður felags viðlíkahaldsjáttanin eisini brúkt til tílík bráðfeingis tiltøk, har ilt er at ætla um kostnaðin frammanundan. Tað kann í hesum sambandi eisini nevnast, at Fíggjarnevndin í 2011 ikki vildi veita eykajáttan til Tekniska Skúla í sambandi við, at soppavøkstur brádliga varð staðfestur har, men í staðin varð peningur brúktur av felags viðlíkahaldsjáttanini."*

Sambært viðmerkingunum í fíggjarlógini til undirkontu 28. "Felagskonta fyri miðnámsskúlar" er kontan "*ætlað til verkætlanina endurskoðan av gymnasialu miðnámsútbúgvingum, har meginparturin fer til gerð av felags námsætlanum fyri fólka- og miðnámsskúlar umframt nýggjan próvtalsstiga. Harumframt er kontan ætlað til verkætlanina endurskoðan av yrkisútbúgvingum, vikarlønir í sambandi við langtíðarsjúku, sernámsfrøðiligan stuðul til næmingar á miðnámsskúlunum o.a"*.

Vit spurdu, um landsstýrismaðurin helt tað vera í tráð við viðmerkingarnar í fíggjarlógini at umvælingar- og viðlíkahaldsútreiðslur til Studentaskúlan í Hoydølum vóru bókaðar á undirkontu 28. "Felagskonta fyri miðnámsskúlar".

Landsstýrismaðurin hevur svarað, at tað er eitt mistak. Upphæddin skuldi verið bókað á undirkontu 21. "Føroya Studentaskúli og HF-skeið" á standardkontu 16 í staðin fyri á undirkontu 28. "Felags fyri miðnámsskúlar".

### 6.2.5 Maritimir skúlar (rakstrarjáttan) 7.23.6.05.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 23.712 t.kr. Minninýtslan er 223 t.kr.

Talan er um eina játtan, sum hevur hesar undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Vinnuháskúlin | 17.830 | 17.458 | -372 |
| 21. Dieselmotorsimulator | 850 | 1.842 | 992 |
| 22. Klaksvíkar sjómansskúli | 3.555 | 3.364 | -191 |
| 30. Føroya Brandskúli | 1.477 | 1.445 | -32 |
| 40. Inntøkufíggjað virksemi | - | -620 | -620 |
| **Tilsamans** | **23.712** | **23.489** | **-223** |

### 6.2.6 Lestrarlán (stuðulsjáttan) 7.23.7.05.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 1.450 t.kr. netto. Minninýtslan er 240 t.kr. netto. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 1.950 t.kr. netto. Í eykajáttanarlógini mai 2010 varð játtanin hækkað 800 t.kr. netto, tí roknað varð við, at lánstørvurin fór at vaksa.

Í eykajáttanarlógini november 2010 varð játtanin lækkað 1.300 t.kr. netto., tí mett var, at útreiðslurnar fóru at verða væl lægri, enn upprunaliga hildið.

Játtanin til lestrarstuðul er ein nettojáttan við útlánum og afturgjaldan:

t.kr.

| Lestrarstuðul 7.23.7.05. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Útlán | 10.500 | 11.237 | 737 |
| Aðrar útreiðslur | - | 7 | 7 |
| Avskrivingar o.a. | 250 | 193 | -57 |
| **Útreiðslur tilsamans** | **10.750** | **11.437** | **687** |
| Afturgjaldan av útlánum vm. | 7.800 | 9.188 | 1.388 |
| Rentuinntøkur | 1.500 | 1.039 | -461 |
| **Inntøkur tilsamans** | **9.300** | **10.227** | **927** |
| **Nettoútreiðslur tilsamans** | **1.450** | **1.210** | **-240** |

### 6.2.7 Søvn Landsins (stuðulsjáttan) 7.24.3.06.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 10.454 t.kr. Minninýtslan er 1.549 t.kr.

Talan er um eina játtan, sum hevur hesar undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 01. Bygdasøvn | 3.359 | 2.476 | -883 |
| 02. Fólkabókasøvn | 6.436 | 5.770 | -666 |
| 03. Ljóðbókaframleiðsla | 528 | 528 | - |
| 04. Listasavn | 131 | 131 | - |
| **Tilsamans** | **10.454** | **8.905** | **-1.549** |

Landsstýrismaðurin vísir til frágreiðing um meirnýtslu á høvuðskonta 7.24.3.05. "Søvn landsins (rakstrarjáttan)".

### 6.2.8 Ítróttahøll á Sandoynni (løgujáttan) 7.24.6.13.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 2.000 t.kr. Sambært landsroknskapinum er øll játtanin nýtt. Í veruleikanum er ein minninýtsla, 188 t.kr., sum við heimild í C.átekningini í eykajáttanarlógini november 2010 er flutt til seinni fíggjarár.

# 7 Heilsumál

## 7.1 Meirnýtsla/frávik

### 7.1.1 Apoteksverkið (rakstrarjáttan) 11.20.2.08.

Í fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 212,2 mió.kr. og ein útreiðslujáttan 212,2 mió.kr. Sambært landsroknskapinum eru inntøkurnar 212,6 mió.kr. og útreiðslurnar 214,3 mió.kr. Meirnýtslan er 1,7 mió.kr. netto.

t.kr.

| Apoteksverkið 11.20.2.08. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Inntøkur | -212.240 | -212.628 | -388 |
| Útreiðslur | 212.240 | 214.326 | 2.086 |
| **Tilsamans** | **-** | **1.698** | **1.698** |

Apoteksverkið hevur havt meirnýtslu í fleiri ár. Niðan fyri hevur Landsgrannskoðanin sett upp meirnýtsluna fyri árini 2005-2010:

t.kr.

| 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 765 | 178 | 799 | 1.153 | 3.988 | 1.698 | **8.581** |

Sambært talvuni er samlaða meirnýtslan árini 2005 – 2010 um 8,6 mió.kr. Landsgrannskoðanin heldur tað ikki vera nøktandi, at hvørt ár er meirnýtsla, og vit spurdu, hvørjar ætlanir landsstýrismaðurin hevur. Landsstýrismaðurin hevur hesa frágreiðing:

*"Landsstýrismaðurin arbeiðir í løtuni við tiltøkum fyri at fáa samanhang ímillum inntøkur og útreiðslur hjá Apoteksverkinum.*

*Høvuðsorsøkin til meirnýtslu hesi árini er ein stórur lønarvøkstur og óvanliga stórar edv-útreiðslur í sambandi við umlegging av edv-skipanini og broytingar í sambandi við stovnsetan av Heilsutrygd. Lønirnar eru hækkaðar 12 mió.kr. í tíðarskeiðinum 2005-2010 og stavar hetta frá almennum lønarhækkingum, umframt at sáttmálabindingar hava havt við sær lønarútgjaldingar til starvsfólk, sum eru farin frá. Harumframt hava starvsfólk verið í farloyvi, har Apoteksverkið fær minni enn helmingin afturbornan frá barsilsskipanini.*

*Árið 2010 vísir eitt undirskot upp á um 1,7 mió.kr. Sølan í 2010 hækkaði sammett við undanfarna ár við 12 mió.kr., og er mesti parturin av hesum søla til aling. Bruttoúrslitið hækkaði við 3 mió.kr., her skal tó leggjast afturat, at vørugoymslan lækkaði við 1,2 mió.kr. Starvsfólkakostnaðurin er hækkaður við 2,4 mió.kr., og stavar hettar millum annað frá almennum lønarhækkingum. Eisini hava starvsfólk verið í barnsburðarfarloyvi og hevur Apoteksverkið ikki fingið fullan stuðul afturbornan frá Barsilsskipanini fyri hetta. Rakstur av fastari ogn er hækkaður 0,7 mió.kr., meðan kostnaður annars er lækkaður við 2,4 mió.kr., og stavar hettar frá lækkaðum edv-útreiðslum.*

*Í viðmerking til roknskapin fyri 2009 stendur, at "Apoteksverkið hevur í árinum sent rokning til Heilsumálaráðið fyri tilbúgvingargoymsluna, sum Føroya Landsstýri hevur álagt landspotekaranum at liggja inni við. Rokningin er enn ikki goldin." Heilsumálaráðið hevur biðið Apoteksverkið um at útreiðsluføra upphæddina.*

*Landsstýrismaðurin hevur havt ætlan um at skipa Apoteksverkið við lóg sum landsstovn uttanfyri fíggjarlógina við gildiskomu frá 1. januar 2011. Lógaruppskotið varð ikki lagt fram sum ætlað. Orsøkin var, at tað ikki var politisk undirtøka fyri uppskotinum. Landsstýrismaðurin hevur alla tíðina verið av tí fatan, at tað var politisk undirtøka fyri leggja uppskotið fram.*

*Í februar 2011 tók nýggjur landsstýrismaður í heilsumálum við. Landsstýrismaðurin hevur enn ikki tikið støðu í málinum."*

### 7.1.2 Suðuroyar sjúkrahús (rakstrarjáttan) 11.20.3.15.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 49.001 t.kr. netto. Meirnýtslan er 305 t.kr. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 48.401 mió.kr. Í eykajáttanarlógini mai 2010 varð játtanin hækkað 600 t.kr.

Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina skuldi ein læknaforvakt verða skipað ma. at røkja tað skaðastovuvirksemi, ið kommunulæknarnir áður hava røkt á sjúkrahúsinum.

Sambært landsstýrismanninum stavar størsti parturin av meirnýtsluni frá longum sjúkrafarloyvum hjá starvsfólkum, ið eru í tilkallivaktum. Harumframt varð læknaforvaktarskipanin dýrari, enn upprunaliga mett.

### 7.1.3 Gigni - heilsufrøði fyri børn & ung (rakstrarjáttan) 11.21.3.12.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 11.175 t.kr. Meirnýtslan er 315 t.kr.

Tilgongdin í 2009, at menna Gigni sum sjálvstøðugan stovn, hevur sambært landsstýrismanninum verið væleydnað men tó kostnaðarmikil. Nakrar útreiðslur at menna stovnin vóru í 2010, sum dømi kunnu nevnast útreiðslur til:

- telefonskipan,
- KT-support,
- journal,
- bókhald,
- fíggjarráðgeving,
- heimasíðuhýsing, og
- viðlíkahald vm.

Umframt hesar skipanir hevur Gigni havt stórar útreiðslur í sambandi við Info Organizer, IP-telefoni, heimasíðu og innliman í Landsnet. Hetta eru útreiðslur, sum bert koma fyri einaferð.

Nevndu viðurskifti gjørdu, at Gigni, hóast sera stór inntriv vórðu gjørd í tað grundleggjandi virksemið, hevði eina meirnýtslu.

## 7.2 Minninýtsla/frávik

### 7.2.1 Heilsumálaráðið (rakstrarjáttan) 11.11.1.24.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 10.791 t.kr. Minninýtslan er 439 t.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum ma. hevur hesar undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 9.389 | 9.078 | -311 |
| 21. Ráð og nevndir | 110 | 92 | -18 |
| 24. Trivnaðarkanningar | 450 | 342 | -108 |
| 26. Tilbúgving | 842 | 840 | -2 |
| **Tilsamans** | **10.791** | **10.352** | **-439** |

Undirkonta 20 "Vanligt virksemi"

Á hesari undirkontu eru minniútreiðslurnar 311 t.kr. Sambært landsstýrismanninum stavar minninýtslan frá, at størv í ráðnum vóru ikki sett alt árið, millum annað í sambandi við stjóraskifti á Landssjúkrahúsinum. Harumframt varð lagt upp fyri møguligum advokatútreiðslum, sum blivu nakað lægri enn væntað.

Undirkonta 24 "Trivnaðarkanningar"

Á hesari undirkontu eru minniútreiðslurnar 108 t.kr. Sambært landsstýrismanninum varð játtanin brúkt til Sjúklinganøgdsemiskanningina.

### 7.2.2 Koppsetingar (lógarbundin játtan) 11.20.1.10.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 5.785 t.kr. Minninýtslan er 699 t.kr. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 6.285 t.kr. Í eykajáttanarlógini august 2010 varð játtanin lækkað 500 t.kr. vísandi til, at undirtøkan hjá pensjónistum at lata seg koppseta hevði ikki verið so stór, sum væntað.

Sambært landsstýrismanninum er talan um hesar veitingar:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Koppsetingar | 5.285 | 4.477 | -808 |
| Koppsetingar fyri pensjónistar | 500 | 609 | 109 |
| **Tilsamans** | **5.785** | **5.086** | **-699** |
| **Virksemi tal** | Játtan | Roknskapur | Frávik |
| Koppsetingar | 8.300 | 7.174 | -1.126 |
| Koppsetingar fyri pensjónistar | 2.500 | 2.754 | 254 |
| **Tilsamans** | **10.800** | **9.928** | **-872** |

Sambært landsstýrismanninum stavar minninýtslan serliga frá, at nógv færri gentur enn ætlað lótu seg koppseta fyri HPV (humant papillomavirus) fyri at fyribyrgja lívmóðirhálskrabba. Ein lítil meirnýtsla var viðvíkjandi koppseting ímóti kikhosta, difteri, stívkrampa, polio, meslingum, reydlingum, fárasjúku og pneumokokkum.

Hinvegin varð talið á pensjónistum, ið lótu seg koppseta, nakað hægri.

### 7.2.3 Læknakanningar av børnum (lógarbundin játtan) 11.20.1.19.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 920 t.kr. Minninýtslan er 219 t.kr. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 1.000 t.kr. Í eykajáttanarlógini november 2010 varð játtanin lækkað 80 t.kr.

Sambært landsstýrismanninun stendst minninýtslan av, at skipanin við at læknakanna børn í skúlaaldri ikki er komin at virka.

### 7.2.4 Heilsutrygd (rakstrarjáttan) 11.20.2.02.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 9.000 t.kr. Minninýtslan er 552 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til minninýtsluna, at tá ið stovnurin byrjaði sítt virksemi 1. januar 2010, vóru eingi starvsfólk sett. Starvsfólkini byrjaðu í tíðarbilinum januar-august, meðan peningur varð settur av til heilársstørv.

### 7.2.5 Heilsutrygdarveitingar (rakstrarjáttan) 11.20.2.03.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 136 mió.kr. Minninýtslan er 2,2 mió.kr. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 108,7 mió.kr. Í eykajáttanarlógini mai 2010 varð játtanin hækkað 27,3 mió.kr

Sambært Búskaparskipan Landsins er talan um hesar veitingar:

kr.

| Heiti | Roknskapur |
|---|---|
| Heilivágur | 56.771.038 |
| Læknahjálp | 24.617.294 |
| Tannviðgerð | 15.496.258 |
| Basisgjald | 6.734.680 |
| Fysiurgisk viðgerð | 5.630.848 |
| Serlæknahjálp | 4.520.584 |
| Gjald fyri læknaveitingar fyri vakt | 4.436.924 |
| Hjálparráð | 4.294.402 |
| Vaktargjald | 3.638.874 |
| Endurgjald fyri jarðarferðarhjálp | 1.559.356 |
| Ógreinað | 1.162.264 |
| Fótarøkt | 1.089.851 |
| Eftirútbúgving og gransking | 937.886 |
| Endurgjald fyri brillur | 825.261 |
| Eftirbataheim | 503.125 |
| Ergoterapi | 500.000 |
| Umvav o.a. | 420.165 |
| Sálarfrøðingar | 256.374 |
| Kiropraktor | 142.550 |
| Endurgjald fyri flutningsútreiðslur | 121.755 |
| Heilivágur, borgarar | 51.776 |
| **Tilsamans** | **133.711.265** |

Landsstýrismaðurin vísir á, at Heilsutrygd fór at virka 1. januar 2010. Av tí at so nógvar broytingar hava verið, er tað, sambært landsstýrismanninum, trupult at útgreina neyvt, hvat minninýtslan er. Skipanin við generiskum umbýti er nýggj, og harafturat kom eisini nýggja heilivágstilskotsskipanin í gildi 1. apríl í 2010.

### 7.2.6 Kommunulæknaskipanin (rakstrarjáttan) 11.20.2.04.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 11.333 t.kr. Minninýtslan er 224 t.kr. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 11.483 t.kr. Í eykajáttanarlógini mai 2010 varð játtanin lækkað 150 t.kr.

Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina varð ein forvakt skipað á Suðuroyar Sjúkrahúsi. Í hesum sambandi vórðu 150 t.kr. fluttar frá kommunulæknaskipanini til Suðuroyar Sjúkrahús.

Sambært landsstýrismanninum varð gjørt av, í sambandi við ískoyti til sáttmálan við Kommunulæknafelag Føroya, sum er galdandi frá 1. oktober 2010, at javnseta kommunulæknar í føstum starvi og avloysarar soleiðis, at avloysarar koma at rinda ein part av lønarútreiðslunum til viðtalustarvsfólkini. Viðtalustarvsfólkini hjá avloysarum skulu verða sett í starv hjá Kommunulæknaskipanini, og tá ið ongin avloysari er, skulu tey eisini kunna arbeiða í øðrum kommunulæknaviðtalum.

Fyri at tryggja, at avloysarar eisini koma at gjalda fyri viðtalustarvsfólk, verður basisgjaldið ikki longur veitt frá Heilsutrygd, men ístaðin flutt til Kommunulæknaskipanina, ið umsita lønarútreiðslur til viðtalustarvsfólk. Upphæddin var í 2010 góðar 700 t.kr.

### 7.2.7 Útbúgving av yngri læknum (rakstrarjáttan) 11.20.2.05.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 5.916 t.kr. Minninýtslan er 892 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til minninýtsluna, at læknar undir útbúgving hava verið í barnsburðarfarloyvi og øðrum farloyvi.

### 7.2.8 Apoteksverkið (løgujáttan) 11.20.2.09.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 7.000 t.kr. Sambært landsroknskapinum er øll játtanin nýtt. Í veruleikanum er ein minninýtsla 2.255 t.kr., sum við heimild í C.átekningini í eykajáttanarlógini november 2010 er flutt til seinni fíggjarár.

Landsstýrismaðurin kunnar um, at ætlanin var at bíða við arbeiðinum til í september 2010, so stígur ikki skuldi koma í arbeiðið, og játtanirnar fyri 2010 og 2011 kundu verið brúktar út í eitt uttan steðg í arbeiðinum. Tá varð roknað við, at øll játtanin fór at verða brúkt í 2010.

Arbeiðið varð tó steðgað, av tí at tað ikki bar til at leggja WFI-leiðingar (serstøk vatnleiðing til sterila framleiðslu) á lønandi hátt. Arbeiðið kundi lutvíst verið lagt um, men tað hevði havt eykaútreiðslur við sær, tí ætlanin var, at hetta arbeiði skuldi verða gjørd í sambandi við aðrar rørleiðingar og liðuggerð av innveggjum.

### 7.2.9 Medicoteknisk tól (løgujáttan) 11.20.3.06.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 16.000 t.kr. Øll játtanin er nýtt. 5,7 mió.kr. eru støðlaðar á fíggjarstøðuna. Sambært C.átekning í eykajáttanarlógini november 2010 er heimilað

landsstýrismanninum at flyta í mesta lagi 10 mió.kr. av óbrúktari játtan til seinni fíggjarár.

Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina november 2010 er orsøkin til C.átekningina, "*at tað kemur at taka nakað av tíð at gera hølini til skannararnar liðug. Eitt fakligt tilmæli um keyp av CT-skannaranum er gjørt, og farið verður nú í samráð við veitara um avtalu um keyp av CT-skannara. Skannarin verður mettur at kosta 10 mió.kr. Høli skulu gerast klár til bæði CT- og MR skannara. Hetta arbeiðið hevur drigið nakað út, orsakað av nýggjum leiðreglum í sambandi við útbjóðing av arbeiðinum.*

*Ætlanin er at gjalda ein part av kostnaðinum av CT-skannaranum við bílegging, restin verður goldin samsvarandi avtalu, ið verður gjørd við veitaran. Skannarin verður latin, tá tað nærkast, at hølini verða liðug. Á hendan hátt ber til at tryggja, at CT-skannarin verður latin við øllum tí nýggjasta.*"

Í landsroknskapinum 2010 er skannarin útreiðsluførdur við 3,3 mió.kr. meðan 5,7 mió.kr. eru støðlaðar á fíggjarstøðuna. Sostatt er heimildin í C.átekningini ikki nýtt. 1 mió.kr. verður goldin sum gáva.

### 7.2.10 Landssjúkrahúsið, útbygging (løgujáttan) 11.20.3.08.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 24.500 t.kr. Sambært landsroknskapinum er øll játtanin nýtt. Í veruleikanum er ein minninýtsla 292 t.kr., sum við heimild í C.átekningini í eyka-játtanarlógini november 2010 er flutt til seinni fíggjarár.

Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 29.000 t.kr. Í eykajáttanarlógini august 2010 varð skotið upp at lækka játtanina 3.500 t.kr. Ein meirluti i Fíggjarnevndini setti fram broytingaruppskot um at lækka játtanina 4.500 t.kr. Broytingaruppskotið varð samtykt, og játtanin lækkaði 4.500 t.kr.

Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina er arbeiðið at prosjektera ætlaða H-bygningin ikki sett í verk enn, umframt at arbeiðið við at umvæla røntgendeildina fer seinni í gongd, enn væntað.

### 7.2.11 Klaksvíkar Sjúkrahús (løgujáttan) 11.20.3.11.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 2.500 t.kr. Sambært landsroknskapinum er øll játtanin nýtt. Í veruleikanum er ein minninýtsla 1.008 t.kr., sum við heimild í C.átekningini í eykajáttanarlógini november 2010 er flutt til seinni fíggjarár.

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina er játtanin ætlað til framhaldandi viðlíkahald av starvsfólkahúsum, yvirlæknahúsinum og einum dupulthúsi oman fyri Víkavegin. Ongar størri ábøtur ella broytingar eru gjørdar av starvsfólkahúsunum, uttan at skrivstovur til fyrisiting og nøkur kanningarrúm eru innrættaðar. Húsini eru bygd í 1960.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at arbeiðið, sum er gjørt, fevnir um nýggja el-innlegging, teldu- og sjónvarpskápling, nýggjar køkar, baðirúm, útskiftan og viðlíkahald av vindeygum, onkrar broytingar av veggjum, isolering av lofti, máling, nýggj loft, møblar, sjónvarp o.s.fr.

# 8 Almannamál

## 8.1 Minninýtsla/frávik

### 8.1.1 Almannamálaráðið (rakstrarjáttan) 12.11.1.26.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 11.048 t.kr. Minninýtslan er 478 t.kr. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 10.748 t.kr. Í eykajáttanarlógini mai 2010 varð játtanin hækkað 300 t.kr.

Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina "*hevur tørvurin á einari nýggjari forsorgarlóg verið eyðsýndur í nógv ár. At lógin ikki er dagførd grundleggjandi síðani miðskeiðis í 60'árunum, hevur ma. havt við sær manglandi gjøgnumskygni, ógreið markamót, trupla fíggjarstýring og ógreið borgararættindi. Nýggj forsorgarlóg er eisini eitt av málunum hjá sitandi samgongu. Arbeiðið við lógini er so víðfevnt, at tað ikki kann fremjast við verandi tilfeingi. Fyri at arbeiðið ikki skal steðga upp, er neyðugt, at játtaðar verða 300 t.kr. til endamálið.*"

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur hesar undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---:|---:|---:|
| 20. Vanligt virksemi | 10.323 | 9.994 | -329 |
| 21. Ráð og nevndir | 98 | 83 | -15 |
| 25. SSP-samstarv | 392 | 297 | -95 |
| 26. Leigunevndin | 235 | 196 | -39 |
| **Tilsamans** | **11.048** | **10.570** | **-478** |

Sambært landsstýrismanninum er minninýtslan í høvuðsheitum hon, at bert 234 t.kr. av eykajáttanini at gera eina nýggja forsorgarlóg vórðu brúktar. Harafturat fóru starvsfólk úr starvi í seinnu helvt av 2010.

Allur stuðulin til SSP-samstarvið varð ikki brúktur í 2010, og varð hann tí mótroknaður í útgjaldinum fyri stuðul fyri 2011.

Orsøkin til minninýtsluna hjá Leigunevndini er, at nevndin tók við á heysti 2010, og tí er ikki talan um fult virksemi í árinum, men samstundis var talan um einnýtisútreiðslur í 2010.

### 8.1.2 Hjálpartólamiðstøðin (rakstrarjáttan) 12.21.1.07.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 7.581 t.kr. netto. Minninýtslan er 244 t.kr. netto. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 7.131 t.kr. netto. Í eykajáttanarlógini mai 2010 varð játtanin hækkað 450 t.kr. netto.

Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina skuldi ein leiguskipan verða sett á stovn á Hjálpartólamiðstøðini, so at myndugleikar, sum annars hava ábyrgd av at veita hjálpartól fyri eitt leigugjald, skulu kunnu leiga hesi tól. Endamálið var at fáa ein skynsamari rakstur av hjálpartólum, sum verða lænt út, tryggja at tólini verða endurnýtt, og at forða fyri at hjálpartólagoymslur verða settar á stovn.

Fyri at leiguskipanin skuldi koma at virka, varð neyðugt at tillaga verandi skipan við at fáa til vega nýggja tøkni og útbúnað.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur hesar undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 7.331 | 7.329 | -2 |
| 40. Inntøkufíggjað virksemi | 250 | 8 | -242 |
| **Tilsamans** | **7.581** | **7.337** | **-244** |

Sambært landsstýrismanninum kom ikki verulig gongd á leiguskipanina í 2010. Samstundis vórðu smáar útreiðslur til nýggj tól, tí í høvuðsheitum vórðu brúkt hjálpartól leigað. Heldur ikki kostaði skipanin so nógv at menna, sum mett var.

### 8.1.3 **Barnavernd** (lógarbundin játtan) 12.21.3.01.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 7.110 t.kr. netto. Minninýtslan er 1.781 t.kr. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 6.110 t.kr. Í eykajáttanarlógini mai 2010 varð játtanin hækkað 1.000 t.kr.

Sambært viðmerkingunum til eykajáttánarlógina var talan um óvanliga trupul mál í 2010. Hildið varð neyðugt at hækka játtanina við um 1 mió.kr. netto, so rúmd var fyri, at 1-2 børn afturat kundu verða send av landinum í 2010.

Sambært landsstýrismanninum varð biðið um eykajáttan, tí Almannastovan metti, at fleiri og dýrari fyriskipanir fóru at verða settar í verk í árinum, enn lagt var upp fyri í fíggjarlógini. Hóast nýggjar fyriskipanir vórðu settar í verk, við tað at børn fóru av landinum, vórðu aðrar fyriskipanir steðgaðar ella broyttar seinni í árinum, og tí er minninýtsla.

### 8.1.4 **Stuðul til uppihaldspening** (lógarbundin játtan) 12.21.3.05.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 9.192 t.kr. Minninýtslan er 1.645 t.kr. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 8.192 t.kr. Í eykajáttanarlógini august 2010 varð játtanin hækkað 1.000 t.kr.

Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina vórðu útreiðslurnar til stuðul til uppihaldspening fyrra hálvár 2010 nakað hægri enn væntað. Undanfarin ár varð goldið meira út seinna hálvár í mun til fyrra hálvár.

Sambært landsstýrismanninum er minninýtslan, at lógarbroytingin, við gildi frá 1. juli 2009, har stuðulin varð lækkaður úr 50% til 40%, hevði størri ávirkan seinnu hálvu í 2010, enn ábendingar vóru um fyrru hálvu av árinum.

### 8.1.5 **Børn og ung** (rakstrarjáttan) 12.21.3.08.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 44.768 t.kr. netto. Minninýtslan er 1.997 t.kr. netto. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 45.268 t.kr. netto. Í eykajáttanarlógini november 2010 varð játtanin lækkað 500 t.kr.

Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina var minni virksemi eitt skifti í 2010.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur hesar undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Føroya Barnaheim | 4.154 | 3.772 | -382 |
| 23. Reiðrið | 2.576 | 2.608 | 32 |
| 24. Familjudepilin | 5.232 | 4.346 | -886 |
| 25. Stuðlar til børn | 22.888 | 23.435 | 547 |
| 28. Bú- og viðgerðartilboð | 9.918 | 8.610 | -1.308 |
| **Tilsamans** | **44.768** | **42.771** | **-1.997** |

Sambært landsstýrismanninum varð øll játtanin á Familjudeplinum ikki brúkt, tí fult virksemi varð ikki á deplinum fyrr enn í juli mánaði 2010.

Talan hevur heldur ikki verið um fult virksemi alt 2010 á undirkontuni "Bú- og viðgerðartilboð". Av tí at hølisviðurskifti ikki vóru komin á pláss, var virksemið, sum áður var á Slóðini, stóran part av árinum í hølum, sum ikki høvdu við sær leigukostnað fyri hesa undirkontu.

Harumframt hevur felags leiðari og -varaleiðari verið fyri virksemið (Rókina/Slóðina), síðani leigumálið í Sornhúsgøtu varð sagt upp.

### 8.1.6 Ættleiðingarstuðul (lógarbundin játtan) 12.21.3.13.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 1.125 t.kr. Minninýtslan er 300 t.kr. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 850 t.kr. Í eykajáttanarlógini november 2010 varð játtanin hækkað 275 t.kr., tí sambært kunning frá Ríkisumboðnum fóru møguliga 4 børn afturat at verða ættleidd í 2010.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at tað vísti seg seinni, at færri børn komu til landið í 2010, enn mett var.

### 8.1.7 Dagpeningaskipanin (lógarbundin játtan) 12.21.4.01.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 58.966 t.kr. netto. Minninýtslan er 2.951 t.kr. netto. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 57.466 t.kr. netto. Í eykajáttanarlógini august 2010 varð játtanin hækkað 2.000 t.kr. netto. Í eykajáttanarlógini november 2010 varð játtanin lækkað 500 t.kr. netto.

Yvirlit yvir eykajáttanirnar:

t.kr.

| Undirkonta | Eykajáttan aug. 2010 | Eykajáttan nov. 2010 |
|---|---|---|
| 01. Løntakarar | 3.000 | -1.000 |
| 05. Arbeiðsgevarans partur, dagpengar | -1.000 | 500 |
| **Tilsamans** | **2.000** | **-500** |

Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina august 2010 vórðu útreiðslur til undirkontuna "løntakarar" nakað hægri fyrra hálvár 2010 enn fyri sama tíðarskeið í 2009.

Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina november 2010 vístu nýggjastu metingarnar hjá Almannastovuni, at nýtslan á undirkontuni "løntakarar" fór ikki at verða so stór, sum roknað var við í august.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur hesar undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 01. Løntakarar: | | | |
| Tilskot til einstaklingar | 60.800 | 59.235 | -1.565 |
| Vanligar flytingarinntøkur[3] | - | -1.424 | -1.424 |
| **01. Løntakarar tilsamans** | **60.800** | **57.811** | **-2.989** |
| 02. Sjálvstøðug og húsarhaldsfólk | 1.117 | 1.187 | 70 |
| 04. Gjald fyri læknaváttanir | 830 | 594 | -236 |
| 05. Arbeiðsgevarans partur, dagpengar | -3.781 | -3.577 | 204 |
| **Tilsamans** | **58.966** | **56.015** | **-2.951** |

Undirkonta 01 "Løntakarar"

Á hesari undirkontu eru minniútreiðslurnar 3 mió.kr.

Landsstýrismaðurin kunnar um, at 945 t.kr., ið viðvíkja 2009, eru av misgáum bókaðar á 2010.

Sambært landsstýrismanninum vístu metingarnar í oktober 2010, at nýtslan fór at verða minni enn væntað.

Sambært § 46 í arbeiðsskaðatryggingarlógini, ið kom í gildi 1. januar 2010, kann Almannastovan áleggja tryggingarfeløgum at endurrinda útreiðslur hjá dagpeninga-skipanini, um skaðin seinni verður viðurkendur sum arbeiðsskaði sambært arbeiðs-skaðatryggingarlógini.

Sambært Almannastovuni varð ikki lagt upp fyri hesum endurgjaldi, 1.424 t.kr., tá ið metingar vórðu gjørdar fyri 2010.

Landsgrannskoðanin mælir til, at hesi endurgjøld í framtíðini verða bókað á serstaka undirkontu.

### 8.1.8 **Serforsorg** (rakstrarjáttan) 12.21.6.01.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 169 mió.kr. Minninýtslan er 4,1 mió.kr. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 171 mió.kr.

Í eykajáttanarlógini mai 2010 varð játtanin lækkað 750 t.kr. Í eykajáttanarlógini august 2010 varð játtanin lækkað 1.300 t.kr.

[3] Endurgjald samb. § 46 í arbeiðsskaðatryggingarlógini (Ll. nr. 67/2009).

Yvirlit yvir eykajáttanirnar:

t.kr.

| Undirkonta | Eykajáttan mai 2010 | Eykajáttan aug. 2010 |
|---|---|---|
| 20. Trivnaðartænastan | -750 | - |
| 21. Stovnsuppihald o.a. í Danmark | - | -800 |
| 22. Endurgj. av pens. til føroyingar í Danmark | - | -300 |
| 23. Ferðaútreiðslur til klientar og avvarðandi | - | - |
| 26. Deildin fyri sinnisveik | - | - |
| 27. Heim fyri heilaskadd | | - |
| 28. Stuðulstænastan | | -200 |
| **Tilsamans** | **-750** | **-1.300** |

Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina mai 2010 fór "Heimið við Keldu-skákið" í Klaksvík, ið skal veita bú- og umlættingarpláss til fólk við autismu, at lata upp seinni enn ætlað.

Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina august 2010 høvdu færri viðskiftafólk stovnsuppihald oa. í Danmark. Víst verður á, at síðani 2007 hevur Nærverkið einans fingið rokning frá einari danskari kommunu viðvíkjandi endurgjaldi fyri pensjón til føroyingar í Danmark. Seinastu árini hevur upphæddin verið støðlað á fíggjarstøðuna. Eisini vórðu Stuðulstænastan og Trivnaðartænastan løgd saman í árinum, og hildið varð, at tað fór at hava eina sparing við sær.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Trivnaðartænastan | 101.900 | 101.053 | -847 |
| 21. Stovnsuppihald oa. í Danmark | 20.210 | 17.991 | -2.219 |
| 22. Endurgj. av pens. til føroyingar í Danmark | 1.052 | 1.052 | - |
| 23. Ferðaútreiðslur til klientar og avvarðandi | 50 | 21 | -29 |
| 26. Deildin fyri sinnisveik | 20.224 | 19.714 | -510 |
| 27. Heim fyri heilaskadd | 3.876 | 3.827 | -49 |
| 28. Stuðulstænastan | 21.679 | 21.194 | -485 |
| **Tilsamans** | **168.991** | **164.852** | **4.139** |

### Undirkonta 21. "Stovnsuppihald o.a. í Danmark"

Á hesari undirkontu eru minniútreiðslurnar 2,2 mió.kr. Settar eru av 1,2 mió.kr.

Sambært Búskaparskipan Landsins eru kr. 60.447 nýttar til ferðing og flutning uttan-lands fyri starvsfólk í Nærverkinum. Vit spurdu, hví útreiðslurnar eru bókaðar á hesa kontu. Landsstýrismaðurin hevur hesa frágreiðing:

> *"Í sambandi við skipað eftirlit, hevur Nærverkið verið niðri á fleiri stovnum og fingið styrkt sambond, fingið frágreiðingar og handlingsplanir, kannað um brúkarin fær nøktandi tilboð, og samstundis fingið kontakt við kommunurnar, sum senda rokningar til Nærverkið.*
>
> *Hetta hevur betrað um fíggjarviðurskiftini, soleiðis at Nærverkið nú fær uppgerðir og veit, hvat goldið verður fyri.*
>
> *Aftaná kommunusamanleggingina í 2007, hevur samskiftið verið vánaligt, og fleiri krøv frá kommununum manglaðu, so torført var hjá Nærverkinum at fáa útreiðslurnar bókaðar í rætt*

*tíðarskeið. Nærverkið hevur fingið játtan á hesari undirkontuni til eftirlit, og ferðirnar eru í samband við eftirlitið.*

*Saman við stovnsleiðslunum í Danmark hevur Nærverkið gjøgnumhugt handlingsplanir, og eftirfylgjandi eru justeringar gjørdar, soleiðis at fleiri tilboð nú eru vorðin bíligari. Harumframt hevur Nærverkið 4 borgarar, har gjaldskommunan ikki er avklárað enn. Nærverkið hevur rindað fyri nevndu borgarar áðrenn kommunusamanleggingina. Nærverkið er í gongd við at fáa hesi mál avklárað."*

Undirkonta 22. "Endurgjald av pensjón til føroyingar í Danmark"

Sambært Búskaparskipan Landsins eru 206 t.kr. endurrindaðar til eina kommunu í Danmark. Settar eru av 846 t.kr.

Landsstýrismaðurin kunnar um, at Almannamálaráðið í apríl 2011 hevur boðað Nærverkinum frá, at Nærverkið ikki skal rinda donskum kommunum endurgjald fyri pensjón til føroyingar í Danmark.

Av tí at kommunan kann kæra málið, verða útreiðslurnar, sum eru støðlaðar seinastu árini, ikki inntøkuførdar í 2011. Støða má takast til játtanina í framtíðini, av tí at reglur kunnu verða ásettar um, hvør skal rinda útreiðslurnar.

### 8.1.9 Bústovnar o.a. (løgujáttan) 12.21.6.02.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 23.000 t.kr. Minninýtslan er 567 t.kr. Í veruleikanum er ein minninýtsla 6.067 t.kr. Við heimild í C.átekningini í eykajáttanarlógini november 2010 eru 5.500 t.kr. fluttar til seinni fíggjarár.

Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 31.000 t.kr. Í eykajáttanarlógini august 2010 varð skotið upp at lækka játtanina 4.800 t.kr., og at nýta játtanina á nøkrum rakstrarjáttanum. Fíggjarnevndin tók ikki undir við at flyta frá løgujáttan til rakstrarjáttan og setti fram broytingaruppskot um at strika játtanina. Broytingaruppskotið varð samtykt, og játtanin varð ikki lækkað.

Í eykajáttanarlógini november 2010 varð játtanin lækkað 8.000 t.kr., tí hesin peningur fór ikki at verða brúktar í 2010.

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina er játtanin ætlað til:

a) sambýli í Tórshavn til sinnisveik,
b) økisdepilin í Vági til sinnisveik,
c) stovn til fjølbrekað børn,
d) at fyrireika bygging av nýggjum stovni til børn og ung, og
e) at fyrireika nýggjan stovn til heim fyri heilaskadd.

Við fíggjarnevndarskjali 25. mai 2010 varð heimilað landsstýrismanninum at nýta part av játtanini til at gera heimið í Klaksvík til fólk við autismu liðugt.

Við fíggjarnevndarskjali 16. desember 2010 varð heimilað landsstýrismanninum at nýta part av játtanini til at keypa ognina á matr. nr. 1VI í Ovaragøtu 46 í Hoyvík, og til at fáa viðurskiftini á undirlendinum á matr. nr. 1U á Niðarugøtu 15 í Hoyvík í rættlag. Sambært Búskaparskipan Landsins er játtanin nýtt til:

t.kr.

| Verkætlan | Upphædd |
|---|---|
| 1. Sambýlið í Tórshavn til sinnisveik | 28 |
| 2. Økisdepilin í Vági til sinnisveik | 15.844 |
| 3. Autistaheimið í Klaksvík | 504 |
| 4. Depil til fjølbrekað børn | 23 |
| 5. Keyp av Ovaragøtu í Hoyvík | 534 |
| 6. Flutt løgujáttan | 5.500 |
| **Tilsamans** | **22.433** |

### 8.1.10 Ansingarsamsýning (lógarbundin játtan) 12.21.6.10.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 15.306 t.kr. Minninýtslan er 1.752 t.kr. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 17.306 t.kr. Í eykajáttanarlógini august 2010 varð játtanin lækkað 1.500 t.kr., av tí at færri fólk høvdu verið í skipanini fyrra hálvár í 2010 í mun til í 2009.

Í eykajáttanarlógini november 2010 varð játtanin lækkað 500 t.kr. vísandi til, at nýggjastu metingarnar hjá Almannastovuni vístu, at játtanin kundi verða lækkað við 500 t.kr. afturat.

Landsstýrismaðurin vísir á, at 10 færri fólk vóru í skipanini í 2010 enn í 2009.

### 8.1.11 Vanlig Forsorg (lógarbundin játtan) 12.21.7.01.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 148,5 mió.kr. netto. Minninýtslan er 10,8 mió.kr. netto. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 168,8 mió.kr. netto.

- Í eykajáttanarlógini mai 2010 varð játtanin lækkað 14,4 mió.kr. netto.
- Í eykajáttanarlógini august 2010 varð játtanin lækkað 4,9 mió.kr. netto.
- Í eykajáttanarlógini november 2010 varð játtanin lækkað 1 mió.kr. netto.

Yvirlit yvir eykajáttanirnar: t.kr.

| Undirkonta | Eykajáttan mai 2010 | Eykajáttan aug. 2010 | Eykajáttan nov. 2010 |
|---|---|---|---|
| 01. Fyribils hjálp § 9 | - | -1.000 | - |
| 02. Varandi veiting § 13 | - | - | - |
| 03. Stakútreiðslur § 15 | - | -400 | - |
| 04. Meirútreiðslur brekað barn § 17 | -6.868 | -3.000 | -1.000 |
| 05. Endurbúgving § 18 | - | 1.500 | 1.000 |
| 06. Hjálparamboð vm. § 18 | -9.985 | -4.000 | -2.000 |
| 07. Arbeiðsloysisforsorg § 9, stk. 2 | - | 1.500 | - |
| 08. Hjálp til viðgerð o.a. á serligum stovnum § 16 | 2.500 | - | - |
| 09. Hoyritól | - | 500 | 1.000 |
| **Tilsamans** | **-14.353** | **-4.900** | **-1.000** |

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 01. Fyribils hjálp § 9 | 15.456 | 14.619 | -837 |
| 02. Varandi veiting § 13 | 1.182 | 776 | -406 |
| 03. Stakútreiðslur § 15 | 3.514 | 3.019 | -495 |
| 04. Meirútreiðslur brekað barn § 17 | 19.029 | 16.519 | -2.510 |
| 05. Endurbúgving § 18 | 41.125 | 39.693 | -1.432 |
| 06. Hjálparamboð vm. § 18 | 31.832 | 28.112 | -3.720 |
| 07. Arbeiðsloysisforsorg § 9, stk. 2 | 14.771 | 13.027 | -1.744 |
| 08. Hjálp til viðgerð o.a. á serligum stovnum § 16 | 14.932 | 15.277 | 345 |
| 09. Hoyritól | 6.704 | 6.661 | -43 |
| **Tilsamans** | **148.545** | **137.703** | **-10.842** |

Undirkonta 04 "Meirútreiðslur brekað barn § 17"

Á hesari undirkontu eru minnútreiðslurnar 2,5 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum er høvuðsorsøkin til minniútreiðslurnar:

- minking í útreiðslunum til endurgjald fyri inntøkumiss, og
- minking í útreiðslum til aðrar sjúkraútreiðslur.

Talan er um kunngerðir frá mai 2009, sum avmarka endurgjøld fyri inntøkumiss o.a. umframt nágreiningar.

Undirkonta 05 "Endurbúgving § 18"

Á hesari undirkontu eru minnútreiðslurnar 1,4 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum vístu framrokningar og metingar av nýtsluni fyri 2010:

*at* talið á persónum fór at verða hægri,

*at* talið á veitingum fór at vaksa, av tí at persónarnir vórðu longri í skipanini, enn frammanundan, og

*at* lutfalsliga fleiri fólk fóru at verða stuðlað til endurbúgving gjøgnum eina yrkislæru ella arbeiðsuppvenjing.

Tá ið avtornaði vístu metingarnar seg at vera heldur høgar, tí er minninýtsla 1,4 mió.kr.

Undirkonta 06 "Hjálparamboð vm. § 18"

Á hesari undirkontu eru minnútreiðslurnar 3,7 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum stavar minninýtslan serliga frá færri íbúðabroytingum og bilum enn roknað var við. Á hesari kontu kunnu einstakar játtanir hava stórar útreiðslur við sær.

Undirkonta 07 "Arbeiðsloysisforsorg § 9, stk. 2"

Á hesari undirkontu eru minnútreiðslurnar 1,7 mió.kr. Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at samfelagsgongdin heystið 2010 varð betri enn væntað, men tá ið Fiskavirking steðgaði primo desember 2010, vuksu útreiðslurnar hjá arbeiðsloysisforsorgini aftur.

### 8.1.12 Fyritíðarpensjón (lógarbundin játtan) 12.21.8.05.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 268 mió.kr. Minninýtslan er 3,7 mió.kr. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 267,9 mió.kr. Í eykajáttanarlógini mai 2010 varð játtanin lækkað 5,1 mió.kr. Í eykajáttanarlógini august 2010 varð játtanin hækkað 5,2 mió.kr.

Yvirlit yvir eykajáttanini: t.kr.

| Undirkonta | Eykajáttan mai 2010 | Eykajáttan aug. 2010 |
|---|---|---|
| 01. Hægsta fyritíðarpensjón | -1.831 | 12.000 |
| 02. Miðal fyritíðarpensjón | -2.436 | -3.500 |
| 03. Lægsta fyritíðarpensjón | -850 | -3.500 |
| 04. Avlamisveiting | - | 600 |
| 05. Læknaváttanir | - | -400 |
| **Tilsamans** | **-5.117** | **5.200** |

Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina mai 2010 fór frá 1. apríl 2010 ikki at verða veittur stuðul til heilivág sambært almannapensjónslógini. Hesin stuðul skuldi í framtíðini verða veittur sambært løgtingslóg um almenna heilsutrygd.

Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina august 2010 fóru útreiðslurnar til hægstu fyritíðarpensjón at verða um 12 mió.kr. hægri, enn mett var. Hinvegin varð mett, at útreiðslurnar til miðal-, og lægstu fyritíðarpensjón fóru at verða 7 mió.kr. lægri.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 01. Hægsta fyritíðarpensjón | 127.629 | 124.475 | -3.154 |
| 02. Miðal fyritíðarpensjón | 92.010 | 91.742 | -268 |
| 03. Lægsta fyritíðarpensjón | 43.765 | 44.148 | 383 |
| 04. Avlamisveiting | 3.526 | 3.291 | -235 |
| 05. Læknaváttanir | 1.037 | 643 | -394 |
| **Tilsamans** | **267.967** | **264.299** | **-3.668** |

Undirkonta 01 "Hægsta fyritíðarpensjón"

Á hesari undirkontu eru minnútreiðslurnar 3,2 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum vuksu útreiðslurnar av hægstu fyritíðarpensjón nógv fyrra hálvár 2010. Tí varð søkt um eykajáttan á 12 mió.kr. í august 2010. Vøksturin vísti seg tó ikki at halda fram alt árið, og tí var minninýtsla 3,2 mió.kr.

Landsstýrismaðurin vísir harafturat á, at lógarbroytingar hava verið gjørdar seinastu árini, og tí er ringt at meta um útreiðslurnar.

Talan hevur eisini verið um flytingar millum hægstu, miðal og lægstu fyritíðarpensjón. Samlaða talið av fyritíðarpensjónistum er ikki vaksið.

# 9 Innlendismál

## 9.1 Meirnýtsla/frávik

### 9.1.1 Landsins ognir (rakstrarjáttan) 15.11.1.23.

Í fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 1.575 t.kr. Minniinntøkan er 141 t.kr. Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Oljugoymslur o.a | -1.200 | -1.200 | - |
| 21. Húsaleiga og íbúðargjald | -390 | -259 | 131 |
| 22. Leiga av økjum, uppisitaraavgjald o.a | 15 | 25 | 10 |
| **Tilsamans** | **-1.575** | **-1.434** | **141** |

Undirkonta 20. "Húsaleiga og íbúðargjald"

Á hesari undirkontu eru minniinntøkurnar 131 t.kr. Sambært landsstýrismanninum kemst minniinntøkan serliga av ov høgt budgetteraðum inntøkum.

### 9.1.2 Hin føroyski Happadrátturin (rakstrarjáttan) 15.14.3.01.

Í fíggjarlógini er ein inntøkujáttan 913 t.kr. Minniinntøkan er 586 t.kr.

Landsstýrismaðurin vísir á, at áhugin fyri Happadráttinum er nógv minkaður. Sølan av lutaseðlum er støðugt lækkað og hevur ongantíð verið so lág sum í 2010 (í øllum førum seinastu 10 árini). Ll. nr. 49/1950 "um føroyskan happadrátt" er sett úr gildi 1. januar 2011.

### 9.1.3 Akstovan (rakstrarjáttan) 15.38.4.01.

Í fíggjarlógini er ein nettoinntøkujáttan 713 t.kr. Minniintøkan er 445 t.kr. netto. Í fíggjarlógini er ein útreiðslujáttan 11.173 t.kr. og ein inntøkujáttan 11.886 t.kr. Sambært landsroknskapinum 2010 eru útreiðslurnar 11.295 t.kr. og inntøkurnar 11.563 t.kr.

| Akstovan 15.38.3.01. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Útreiðslur | 11.173 | 11.295 | 122 |
| Inntøkur | -11.886 | -11.563 | 323 |
| **Tilsamans** | **-713** | **-268** | **445** |

Í eykajáttanarlógini august 2010 varð skotið upp at hækka játtanina 900 t.kr. Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina eru inntøkurnar minni, tí at samlaða talið á skrásettum bilum er lækkað meira, enn roknað varð við.

Í viðmerkingunum verður eisini víst á, at leigumálið, har sum Akstovan hevði sýn í Skálabotni, gekk út um árskiftið 2010, og virksemið varð flutt í nýtt leigumál á Glyvrum. Neyðugt var at gera ávísar ábøtur og tillagingar fyri at kunna brúka høllina. Útreiðslur í hesum sambandi vóru 300 t.kr., umframt hægri leiguútreiðslur. Eisini eru KT-útreiðslurnar 175 t.kr. hægri, enn mett var.

Fíggjarnevndin tók ikki undir við at økja játtanina til Akstovuna og setti fram broytingaruppskot samsvarandi. Broytingaruppskotið varð samtykt, og Akstovan fekk onga eykajáttan.

Sambært landsstýrismanninum stóðst meirnýtslan av, at inntøkurnar at sýna bilar vórðu lægri, enn mett var frammanundan. Harumframt vóru ymiskar óvæntaðar útreiðslur.

## 9.2 Minninýtsla/frávik

### 9.2.1 Innlendismálaráðið (rakstrarjáttan) 15.11.1.39.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 15.515 t.kr. Minninýtslan er 1.409 t.kr.

Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 14.115 t.kr. Í eykajáttanarlógini mai 2010 varð skotið upp at hækka játtanina 1.400 t.kr. til at halda áfram við arbeiðinum at gera konsessjónsavtaluna og ráðgeva um fígging í sambandi við Skálafjarðartunnilin.

Fíggjarnevndin setti fram broytingaruppskot um eisini at veita eina inntøkujáttan 3.500 t.kr. Broytingaruppskotið varð samtykt, og inntøkurnar vórðu hækkaðar 3.500 t.kr.

Í eykajáttanarlógini november 2010 varð játtanin lækkað 3.500 t.kr. Í viðmerkingunum til eykajáttanarlógina verður greitt frá, at inntøkan 3.500 t.kr. var treytað av, at loyvisavtala varð skrivað undir við P/F Skálafjarðartunnilin fyri 1. desember 2010.

Sambært landsstýrismanninum er høvuðsorsøkin til minninýtsluna:

*at* útreiðslurnar til ráðgeving í sambandi við Skálafjarðartunnilin vórðu 500 t.kr. minni, enn roknað varð við,

*at* ávísar sparingar vórðu framdar innan lønarútreiðslur, og

*at* útreiðslurnar í sambandi við yvirtøku av revsirættinum og fyrisiting av peningaogn hjá verjuleysum vórðu eitt sindur lægri, enn mett var frammanundan.

### 9.2.2 Umvæling av almennum bygningum (løgujáttan) 15.11.1.56.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 14.900 t.kr. Sambært landsroknskapinum er øll játtanin nýtt. Í veruleikanum er ein minninýtsla 113 t.kr., sum við heimild í C.átekningini í eykajáttanarlógini november 2010 er flutt til seinni fíggjarár.

Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 17.000 t.kr. Í eykajáttanarlógini mai 2010 varð játtanin lækkað 2.100 t.kr. tí *"neyðugt er at finna sparingar innan løgur í sambandi við eykajáttanarlógina."*

Sambært viðmerkingunum til løgtingsfíggjarlógina er játtanin á høvuðskontu 15.11.1.56. "Umvæling av almennum bygningum" ætlað til *"umvæling og bjálving av almennum bygningum*

Sambært Búskaparskipan Landsins er talan um hesar verkætlanir:

kr.

| Heiti | Roknskapur |
|---|---|
| 1) Studentaskúlin í Hoydølum | 1.719.360 |
| 2) Prestagarðurin á Todnesi | 1.506.541 |
| 3) Skúlaheimið í Klaksvik | 1.449.586 |
| 4) Sjóndepilin | 1.212.727 |
| 5) Klaksvíkar Sjúkrahús/Læknahúsið í Klaksvík | 1.172.254 |
| 6) Læraraskúlin (venjingarskúlin) | 672.599 |
| 7) Skúlin á Trøðni | 654.514 |
| 8) Veðurstøðin | 626.849 |
| 9) Eysturoyar Røktar- og Ellisheim | 492.515 |
| 10) Ellisheimið á Sýnini í Vágum | 478.199 |
| 11) Tekniski skúli, Tórshavn | 475.131 |
| 12) Børkugøta 1, bústovnur | 425.017 |
| 13) Læknahús á Tvøroyri | 413.952 |
| 14) Akstovan í Tórshavn | 347.601 |
| 15) Norðoya Røktarheim | 255.629 |
| 16) Prestagarðurin á Brekku | 243.826 |
| 17) DUGNI, skúlin við Áir | 236.516 |
| 18) Gl. Landsbókasavn "Gróthús" | 213.780 |
| 19) Almannamálaráðið | 214.876 |
| 20) Kokkaskúlin í Klaksvík | 183.733 |
| 21) Garagan við Oyggjarvegin | 165.836 |
| 22) Handilsskúlin á Kambsdali | 153.122 |
| 23) Landssjúkrahúsið | 149.485 |
| 24 Prestagarðurin í Sandágerði | 118.448 |
| 25) Mentamálaráðið | 109.319 |
| 26) Tilbúgvingarstovnurin | 102.751 |
| 27) Listasavn Føroya | 100.515 |
| 28) Føroya Fornminnissavn | 100.183 |
| 29) Havstovan | 72.514 |
| 30) Suðuroyar Sjúkrahús og -Røktarheim | 65.811 |
| 31) Vitanarstovnurin í Mentamálaráðnum | 60.520 |
| 32) Verkstaðið Vón | 57.068 |
| 33) Føroya Landsbókasavn | 56.009 |
| 34) Ellis- og Røktarheimið á Sandoynni | 53.874 |
| 35) Sambýlið, Niðaragøta 15 | 48.045 |
| 36) Fróðskaparsetur Føroyar | 47.078 |
| 37) Sambýlið undir Fobbakletti | 45.066 |
| 38) Búnaðardepilin | 43.879 |
| 39) Innlendismálaráðið | 41.520 |
| 40) Gl. miðnámsskúlin í Vági | 37.810 |
| 41) Studentaskúlin & HF-skeiðið í Fuglafirði | 34.820 |

| Heiti | Roknskapur |
|---|---:|
| 42) Landslæknahúsið Tórshavn | 27.858 |
| 43) Prestagarðar generelt | 23.500 |
| 44) Hvalastøðin við Áir | 20.339 |
| 45) Løgmansskrivstovan | 18.900 |
| 46) Vinnuháskúlin, Trygdardepilin við Áir | 14.495 |
| 47) Miðnámsskúlin í Hovi | 10.840 |
| 48) Ymiskar umvælingar | 11.773 |
| 49) Flutt løgujáttan | 113.000 |
| **Tilsamans** | **14.899.583** |

Í 2010 er játtanin ma. nýtt til verkætlanir, har tað í løgtingsfíggjarlógini 2010 eisini eru serskildar løgujáttanir:

Ad 1) Studentaskúlin í Hoydølum

Nýttar eru 1.719 t.kr. til ma.:

- 351 t.kr. til ymiskar umvælingar
- 348 t.kr. til lønir til Landsverk
- 327 t.kr. til soppakanningar
- 322 t.kr. til ventilatión
- 200 t.kr. til eykaútreiðslur til ábøtur á loft og gólv og soppavask
- 88 t.kr. til røkt av lendi

Á høvuðskontu 7.23.3.28. "Studentaskúlin í Hoydølum" (løgujáttan) eru játtaðar 3,7 mió.kr. til løguarbeiði í sambandi við krøv frá Brunaumsjón Landsins og Arbeiðs-eftirlitinum. Øll játtanin er nýtt.

Harumframt eru á høvuðskontu 7.23.3.05. "Miðnámsútbúgvingar" bókaðar kr. 1.067.273 í umvælingar- og viðlíkahaldsútreiðslum til Studentaskúlin í Hoydølum:

- kr. 677.257 á undirkontu 21. "Føroya Studentaskúli og HF-skeið"
- kr. 390.016 á undirkontu 28. "Felags fyri miðnámsskúlar"[4]

Samlaðu umvælingar- og viðlíkahaldsútreiðslurnar í 2010 til Studentaskúlan í Hoydølum eru sostatt kr. 6.486.416, sum víst niðanfyri:

*kr.*

| Høvuðskonta | Roknskapur |
|---|---:|
| 7.23.3.28. Studentaskúlin í Hoydølum (løgujáttan) | 3.699.783 |
| 7.23.3.05. Miðnánsútbúgvingar (rakstraráttan) | 1.067.273 |
| 15.11.1.56 Umvæling av almennum bygningm (løgujáttan). | 1.719.360 |
| **Tilsamans** | **6.486.416** |

[4] Útreiðslurnar eru bókaðar undir standardkontu 14, á StRk 1469 "Keyp av vørum annars"

Sambært landsstýrismanninum vórðu nýggjar lonir settar upp í Hoydølum. Tað var neyðugt, um skúlin skuldi kunna virka eftir ætlan. Harumframt eru fleiri ábøtur á verandi bygningar. Alt hetta hava verið bráðneyðugar umvælingar.

Í juni 2009 boðaði landsstýrismaðurin frá, at "*í studentaskúlanum ganga fleiri hundrað næmingar, umframt lærarar og onnur starvsfólk. Fólk gerast sjúk av vánaligum inniklima, og lýkur skúlin ikki tey krøv Brunaumsjón landsins setur. Ein sera hættislig støða*".

Sambært landsstýrismanninum var tað orsøkin til, at peningur eisini varð nýttur av játtanini til umvæling av almennum bygningum. Ein praktisk loysn, sum loysti ein sera stóran trupulleika.

Landsgrannskoðanin vil vísa til viðmerkingarnar á høvuðskontu 7.23.3.08. "Studentaskúlin í Hoydølum (løgujáttan)" undir Kap. 6 "Mentamál", har málið eisini er umrøtt.

Ad 5) Klaksvíkar Sjúkrahús/Læknahúsið

Nýttar eru 1.172 t.kr. til:

kr.

| Verkætlan | Roknskapur |
|---|---|
| Nýggju læknahúsini | |
| Orkudagføring | 248.567 |
| **Tilsamans** | **248.567** |
| Høvuðsbygningur: | |
| Dagføring av fýrrúmi | 100.000 |
| Ráðgeving | 21.111 |
| **Tilsamans** | **121.111** |
| Millumbygningur: | |
| Dagføring av ventilatiónsskipanini | 512.969 |
| Implementering av Talgildu Heilsuskipanini | 88.805 |
| Ráðgeving og eftirlit | 76.687 |
| El-arbeiði | 68.631 |
| Snikkaraarbeiði | 25.000 |
| Lønir Landsverk | 20.320 |
| Arbeiðstøkutrygging | 7.664 |
| Arbeiðseftirlitið | 2.500 |
| **Tilsamans** | **802.576** |
| **Tilsamans** | **1.172.254** |

Á høvuðskontu 11.20.3.11. "Klaksvíkar Sjúkrahús" (løgujáttan) eru játtaðar 2,5 mill.kr. til at halda fram við viðlíkahaldinum av starvsfólkahúsum, yvirlæknahúsinum og einum dupulthúsi oman fyri Víkavegin.

Sambært landsstýrismanninum hevur Landsverk ikki ræðisrætt til høvuðskontu 11.20.3.11. "Klaksvíkar sjúkrahús (løgujáttan)", og tískil ikki ávirkan á, hvussu tann játtanin hevur verið brúkt. Tær umvælingar, sum Landsverk hevur staðið fyri á Klaksvíkar sjúkrahúsi, hava fyrst og fremst havt við orkusparandi tiltøk at gera.

Ad 23) Landssjúkrahúsið

Nýttar eru 149 t.kr. Meginparturin 143 t.kr. eru nýttar til gólvarbeiði. Á høvuðskontu 11.20.3.08. "Landssjúkrahúsið, umbygging" (løgujáttan) eru játtaðar 24,5 mill.kr. til útbygging, umbygging og umvæling av Landssjúkrahúsinum

Ad 30) Suðuroyar Sjúkrahús

Nýttar eru 66 t.kr. Av teimum eru 46 t.kr. nýttar til HVS-arbeiði og 20 t.kr. til prosjekt-uppfylging og ráðgeving.

Á høvuðskontu 11.20.3.16. "Suðuroyar Sjúkrahús" (løgujáttan) eru játtaðar 2,5 mill.kr at nútíðargera starvsfólkabygningin hjá sjúkrahúsinum.

Aðrar viðmerkingar

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í juni 2010 vísti Landsgrannskoðanin ma. á:

> *"Hinvegin halda vit, at tá ið tað í fíggjarlógini, í viðmerkingunum til eina verklagslóg ella eina løgukontu, greitt verður kunnað um endamálið við lógini/játtanini, er tað ikki altíð skilagott, at útreiðslur til sama endamál kunnu verða bókaðar á kontur til generelt viðlíkahald.*
>
> *Landsgrannskoðanin heldur ikki, at roknskapurin verður nóg gjøgnumskygdur, tá ið ein stovnur ella aðalráð spjaðir viðlíkahaldsútreiðslur á aðrar játtanir, ið stovnurin hevur ræði á. Tílík bókingarmannagongd, sum hevur verið nýtt í 2009, kann avlaga og grugga landsroknskapin."*

Landsstýrismaðurin tekur undir við landsgrannskoðanini, tá ið sagt verður: *"Tá ið viðlíkahaldsútreiðlsur verða spjaddar út á ymsar játtanir, kann tað verða trupult at fáa gjøgnumskygni í roknskapin".* Landsstýrismaðurin vísir á:

- *at* viðmerkingarnar til játtanina til viðlíkahald av almennum bygningum eru breitt orðaðar, og avmarka í grundregluni ikki Landsverk at brúka pening, har serstøk íløgujáttan er annars. Her er talan um almennar bygningar í breiðum høpi.
- *at* allar verkætlanir hjá Landsverki hava eitt serstakt verkætlanarnummar, soleiðis at Landsverk altíð kann síggja/eftirkanna, hvussu nógvur peningur er brúktur til hvørja verkætlan.
- *at* íløguætlanin verður gjørd í samráði við øll aðalráð, áðrenn raðfest verður. Tað kann merkja, at peningur í einstøkum førum verður játtaður bæði av viðlíka-haldskontuni og á serligari íløgujáttan.
- *at* tað snýr seg ikki bert um bókingar, men eisini um
  - hvør nytta fæst burtur úr játtanum landsins,
  - hvar átrokandi (akuttur) tørvur er á at gera íløgur,
  - og eisini, at játtanir landsins verða brúktar optimalt.

Landsstýrismaðurin kunnar um, at Innlendismálaráðið og Landsverk hava tikið atfinningarnar frá Landsgrannskoðanini til eftirtektar, og ongin peningur verður brúktur til verkætlanir, har serstøk íløgujáttan til almennar bygningar er frammanundan.

### 9.2.3 Ymiskar útreiðslur (rakstrarjáttan) 15.14.1.01.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 1.232 t.kr. Minninýtslan er 386 t.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Kunngerðarsavn og -blað | 598 | 555 | -43 |
| 21. Lógarsavn | 174 | 92 | -82 |
| 22. Dóms- og løgreglumál | 120 | 59 | -61 |
| 23. Útreiðslur av vali | 120 | 2 | -118 |
| 24. Navnanevndin | 110 | 88 | -22 |
| 25. Føroyskt lógarrit | 60 | - | -60 |
| 26. Rættarhjálp Føroya | 50 | 50 | - |
| **Tilsamans** | **1.232** | **846** | **-386** |

Undirkonta 23. "Útreiðslur av vali"

Á hesari undirkontu eru minniútreiðslurnar 118 t.kr. Sambært landsstýrismanninum vóru at kalla ongar útreiðslur til val í 2010, tí onki val varð hildið. Her er vert at viðmerkja, at vanliga eru ávísar útreiðslur til endamálið sjálvt tey ár, onki val verður hildið.

Undirkonta 25. "Føroyskt lógarrit"

Játtanin er 60 t.kr. Ongin peningur er brúktur. Sambært landsstýrismanninum kom Føroyskt Lógar Rit ikki út í 2010.

### 9.2.4 Hin føroyski Happadrátturin - fyrisiting (rakstrarjáttan) 15.14.3.04.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 913 t.kr. Minninýtslan er 364 t.kr.

Landsstýrismaðurin vísir á, at áhugin fyri Happadráttinum er nógv minkaður. Sølan av lutaseðlum er støðugt lækkað, og hevur ongantíð verið so lág sum í 2010 (í øllum førum seinastu 10 árini). Ll. nr. 49/1950 "um føroyskan happadrátt" er sett úr gildi 1. januar 2011.

### 9.2.5 Orkumál (stuðulsjáttan) 15.37.4.07.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 4.000 t.kr. Minninýtslan er 399 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum fingu seks umsøkjarar tilsøgn um stuðul. Ein teirra fekk tilsøgn um 399 t.kr. í stuðli. Felagið boðaði seint í árinum frá, at verkætlanin ikki bleiv framd, tí er minninýtsla.

### 9.2.6 Landsverk (rakstrarjáttan) 15.38.1.02.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 67.328 t.kr. Minninýtslan er 3.406 t.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 8.482 | 8.455 | -27 |
| 22. Byggi- og bygningaumsiting landsins | 2.820 | 2.736 | -84 |
| 30. Landsvegahald | 49.177 | 49.111 | -66 |
| 35. Havnir | 5.677 | 5.568 | -109 |
| 38. Flogferðsla | 1.172 | 1.166 | -6 |
| 40. Inntøkufíggjað virksemi, hald av landsvegum | - | -3.114 | -3.114 |
| **Tilsamans** | **67.328** | **63.922** | **3.406** |

Undirkonta 40. "Inntøkufíggjað virksemi, hald av landsvegum"

Á hesari undirkontu eru minniútreiðslurnar 3,1 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum vórðu útreiðslurnar minni, enn roknað varð við.

Landsstýrismaðurin kunnar um, at yvirhøvur royndi Landsverk at spara rakstar-útreiðslur á øllum økjum, og tað hevði við sær, at á hinum undirkontunum var ein samlað minninýtslu, 300 t.kr.

### 9.2.7 Nýggir landsvegir (løgujáttan) 15.38.1.07.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 23.600 t.kr. Minninýtslan er 301 t.kr. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 20.600 t.kr. Í eykajáttanarlógini mai 2010 varð játtanin hækkað 3.000 t.kr. til at fara undir vegagerðina í Leirvík.

Sambært viðmerkingunum í fíggjarlógini er játtanin ætlað til:

mió.kr.

| Endamál | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| Brúgvin um Streymin | 7.000 | 7.011 | 11 |
| Rituvíkarvegurin | 3.500 | 3.285 | -215 |
| Øravík-Hov | 2.700 | 3.001 | 301 |
| Trygdartiltøk, størri ábøtur umvælingar | 3.000 | 2.726 | -274 |
| Vegagerð í Kalsoy, vegir, tunlar og havnir | 2.500 | 2.352 | -148 |
| Dagføring av brúm og tunlum | 2.000 | 2.004 | 4 |
| Vegagerð í Leirvík/ Eystur kommuna bátahylur | 3.000 | 2.984 | -16 |
| Søla av jørð til kommunur | -100 | -64 | 36 |
| **Tilsamans** | **23.600** | **23.299** | **-301** |

### 9.2.8 Havnir (løgujáttan)15.38.1.14.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 1.100 t.kr. Minninýtslan er 120 t.kr. Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 2.000 t.kr. Í eykajáttanarlógini mai 2010 varð játtanin lækkað 900 t.kr., tí útreiðslurnar til ábøtur á verjugarðin til verandi bátahyl í Skúgvi vórðu minni, enn mett var.

Sambært landsstýrismanninum var ikki møguligt at gera arbeiðið at styrkja verjugarðin til bátahylin í Skúgvi liðugt fyri ringt veður seint út á árið,

### 9.2.9 Stuðul til infrakervið á útoyggjum (stuðulsjáttan)15.38.1.18.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 3.100 t.kr. Minninýtslan er 446 t.kr.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at kommunur á útoyggj kunnu søkja Landsverk um játtan til infrakervið. Í januar mánað ger Landsverk eitt tilmæli til landsstýrismannin, um hvussu játtanin kann verða brúkt í fíggjarárinum. Tilmælið tekur støði í innkomnum umsóknum.

Landsverk hevur síðan fund við kommunurnar, áðrenn arbeiðini fara í gongd. Avtalað verður, hvør skal standa fyri verkætlanunum. Tá ið árið er endað, verður farið á staðið at kanna, um arbeiðini eru gjørd á ein nøktandi hátt.

Tá kemur ofta fyri, at arbeiðini ikki eru liðug, og tá fær kommunan ikki fullan studning útgoldnan. Eisini kemur fyri, at ikki hevur borið til at gjørt ávís arbeiði fyri veður og manglandi arbeiðsmegi, tí ofta eru tað fólk á staðnum, sum standa fyri arbeiðinum.

# 10 Uttanríkismál

## 10.1 Minninýtsla

### 10.1.1 Uttanríkistænastan (rakstrarjáttan) 16.11.1.54.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 42.058 t.kr. Minninýtslan er 157 t.kr.

Í fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 41.958 t.kr. Í eykajáttanarlógini februar 2010 varð játtanin hækkað 100 t.kr. til eina gávu at geva Vígdis Finnbogadóttir og stovni hennara við sama navni. Føroyar fingu í boði at samskipa og standa á odda fyri einari felags gávu frá øllum norðurlondum.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Uttanríkisráðið | 23.802 | 24.378 | 576 |
| 21. Sendistova Føroya til London | 3.157 | 3.030 | -127 |
| 22. Sendistova Føroya til Keypmannahavnar | 3.785 | 3.625 | -160 |
| 23. Sendistova Føroya til Evropasamveldið | 4.507 | 3.226 | -1.281 |
| 24. Sendistova Føroya til Reykjavíkar | 2.807 | 2.764 | -43 |
| 25. Verkætlanir | - | 1.142 | 1.142 |
| 25. Marknaðarføra Føroyar | 4.000 | 3.736 | -264 |
| **Tilsamans** | **42.058** | **41.901** | **-157** |

Størsta frávikið er á undirkontu 23. "Sendistova Føroya til Evropasamveldið", sum hevur eina minninýtslu 1.281 t.kr. Sambært Uttanríkisráðnum er orsøkin til minninýtsluna, at nakrar uppgávur vórðu fluttar til Uttanríkisráðið.

### 10.1.2 Millumtjóða samstarv (stuðulsjáttan) 16.13.2.04.

Í fíggjarlógini eru játtaðar 3.050 t.kr. Minninýtslan er 212 t.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 01. The Northern Periphery | 1.120 | 1.059 | -61 |
| 02. IMO | 50 | 31 | -19 |
| 03. NORA | 250 | 250 | - |
| 04. Altjóða veiðifelagsskapir | 1.500 | 1.483 | -17 |
| 05. FAO og UNESCO | 130 | 15 | -115 |
| **Tilsamans** | **3.050** | **2.838** | **-212** |

Størsta frávikið er á undirkontu 05. "FAO og UNESCO", sum hevur ein minninýtslu 115 t.kr. Sambært Uttanríkisráðnum er orsøkin til minninýtsluna, at rokning var ikki komin fyri FAO limagjald 2010.

# 11 Samlað yvirlit meir-/minninýtsla

Yvirlitið niðanfyri vísir meir-/minninýtsluna á øllum høvuðskontum í landsroknskapinum. Høvuðskontur, har eingin meir- ella minninýtsla er, eru ikki tiknar við. Viðvíkjandi inntøkum verður víst til brotið undir Fíggjarmálaráðnum.

Í frágreiðingini frammanfyri er greitt frá teimum mest týðandi frávikunum.

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Meirnýtsla | Minninýtsla |
|---|---|---|---|---|
| **Løgmansfyrisitingin** | | | | |
| Løgmansskrivstovan (rakstrarjáttan) | 8.252 | 8.204 | | 48 |
| Umbygging í Tinganesi (løgujáttan) | 2.500 | 2.478 | | 22 |
| Løgmaður og landsstýrið (rakstrarjáttan) | 6.663 | 6.648 | | 15 |
| **Fíggjarmál** | | | | |
| Fíggjarmálaráðið (rakstrarjáttan) | 8.689 | 8.656 | | 33 |
| Flyting av fíggjar-og búskaparstovnum landsins (løgujáttan.) | 900 | 895 | | 5 |
| Sáttmálaviðurskifti (rakstrarjáttan) | 677 | 636 | | 41 |
| TAKS (rakstrarjáttan) | 68.723 | 67.344 | | 1.379 |
| Føroya Gjaldstova (rakstrarjáttan) | 24.361 | 24.371 | 10 | |
| Umsiting av ogn og skuld landsins (rakstrarjáttan) | 1.399 | 1.460 | 61 | |
| Hagstova Føroya (rakstrarjáttan) | 11.440 | 11.469 | 29 | |
| Tænastumannaeftirlønir (lógarbundin játtan) | 21.650 | 21.215 | | 435 |
| Eftirlønir (lógarbundin játtan) | 500 | 501 | 1 | |
| Danskar eftirlønir (lógarbundin játtan) | 1.800 | 1.367 | | 433 |
| Eftirløn landsstýrismanna (lógarbundin játtan) | 1.600 | 1.441 | | 159 |
| Eftirlønir innan heilsuverkið (lógarbundin játtan) | 12.000 | 11.883 | | 117 |
| Stuðul til flutning og dupult húsarhald (lógarbundin játtan) | 18.500 | 16.440 | | 2.060 |
| Stuðul til rentuútreiðslur (lógarbundin játtan) | 95.000 | 92.384 | | 2.616 |
| Stuðul til bygging og umvæling av egnum bústaði (lógarbundin játtan) | 40.000 | 33.658 | | 6.342 |
| Lán til Húsalánsgrunnin | -1.667 | -278 | 1.389 | |
| Læraraeftirlønir (lógarbundin játtan) | 52.400 | 51.001 | | 1.399 |
| FAS-endurgjald (lógarbundin játtan) | 104.800 | 104.879 | 79 | |
| KT-fyrisiting (rakstrarjáttan) | 4.596 | 4.606 | 10 | |
| **Fiskivinnumál** | | | | |
| Fiskimálaráðið (rakstrarjáttan) | 14.668 | 14.090 | | 578 |
| Granskingarætlanir (rakstrarjáttan) | 2.785 | 2.994 | 209 | |
| Tilbúgving á landi(rakstrarjáttan) | 15.960 | 14.323 | | 1.637 |

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Meirnýtsla | Minninýtsla |
|---|---|---|---|---|
| Veðurtænastan (rakstrarjáttan) | 4.740 | 4.606 | | 134 |
| Almennar royndir og ráðgeving (rakstrarjáttan) | 2.770 | 2.769 | | 1 |
| Búnaðarstovan (rakstrarjáttan) | 2.940 | 2.919 | | 21 |
| Landbúnaðarstuðul (stuðulsjáttan) | 12.010 | 12.030 | 20 | |
| Almenn jørð, søla (løgujáttan) | 0 | 15 | 15 | |
| Fiskivinnuráð og nevndir (rakstrarjáttan) | 441 | 416 | | 25 |
| Hvalagransking og hvalateljing vm. (rakstrarjáttan) | 981 | 982 | 1 | |
| Lønjavningarstovan (rakstrarjáttan) | 2.872 | 2.491 | | 381 |
| Fiskiveiðieftirlitið (rakstrarjáttan) | 42.824 | 42.636 | | 188 |
| Havstovan (rakstrarjáttan) | 11.957 | 12.148 | 191 | |
| Ùtgerð til Magnus Heinason (rakstrarjáttan) | 1.470 | 1.461 | | 9 |
| Magnus Heinason (rakstrarjáttan) | 10.863 | 10.835 | | 28 |
| Fiskivinnuroyndir (rakstrarjáttan) | 5.008 | 4.375 | | 633 |
| Inntøkutrygd hjá fiskimonnum (lógarbundin játtan) | 25.000 | 20.649 | | 4.351 |
| Sjúkratrygd (lógarbundin játtan) | 5.200 | 5.034 | | 166 |
| Fiskivinnumenning á landi (stuðulsjáttan) | 800 | 726 | | 74 |
| Flutningsstuðul (lógarbundin játtan) | 3.200 | 2.433 | | 767 |
| Útlán (stuðulsjáttan) | -45.000 | -39.459 | 5.541 | |
| Effektivar veðhaldsútreiðslur (stuðulsjáttan) | -100 | -27 | 73 | |
| Trygdarmiðstøðin (rakstrarjáttan | 2.459 | 2.332 | | 127 |
| **Vinnumál** | | | | |
| Vinnumálaráðið (rakstrarjáttan) | 10.963 | 10.974 | 11 | |
| Javnstøðunevndin (rakstrarjáttan) | 447 | 446 | | 1 |
| Kvinnuluttøka í politikki (rakstrarjáttan) | 196 | 172 | | 24 |
| Jarðfeingi (rakstrarjáttan) | 15.192 | 15.095 | | 97 |
| Søla av seismiskum kanningarúrslitum (stuðulsjáttan) | -75 | -150 | | 75 |
| Djóralæknatænastur (rakstrarjáttan) | 1.024 | 1.025 | 1 | |
| Sjóvinnufyrisitingin (Skipaskrásetingin) (rakstrarjáttan) | 1.017 | 997 | | 20 |
| Skipaeftirlitið (rakstrarjáttan) | 7.864 | 7.836 | | 28 |
| Fiskasjúkutænastur (rakstrarjáttan) | 3.699 | 3.720 | 21 | |
| Sáttmálaeftirlit (rakstrarjáttan) | 73 | - | | 73 |
| Loyvisnevndin (rakstrarjáttan) | 196 | 194 | | 2 |
| El-nevndin (rakstrarjáttan) | 186 | 201 | 15 | |
| Kappingarráðið (rakstrarjáttan) | 1.914 | 1.908 | | 6 |
| Skráseting Føroya (rakstrarjáttan) | -24 | -53 | | 29 |

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Meirnýtsla | Minninýtsla |
|---|---|---|---|---|
| Endurgjald til skipasmíð (stuðulsjáttan) | 500 | 485 | | 15 |
| Rúsdrekkasøla landsins (rakstrarjáttan) | -16.848 | -16.563 | 285 | |
| Heilsufrøðiliga starvsstovan (rakstrarjáttan) | 16.691 | 16.712 | 21 | |
| Umbygging av Heilsufrøðiligu starvsstovuni (løgujáttan) | - | -42 | | 42 |
| Lánsafturgjald (stuðulsjáttan) | -2.500 | -7 | 2.493 | |
| Strandfaraskip landsins (rakstrarjáttan) | 137.346 | 137.473 | 127 | |
| Strandfaraskip landsins (løgujáttan) | 6.843 | 6.841 | | 2 |
| Vága Floghavn (løgujáttan) | 0 | 11 | 11 | |
| Postverk Føroya, eftirlønir (lógarbundin játtan) | 6.440 | 6.436 | | 4 |
| Semingsmannaskipanin (rakstrarjáttan) | 396 | 308 | | 88 |
| Arbeiðseftirlitið (rakstrarjáttan) | 3.536 | 3.572 | 36 | |
| Barsilsskipan (lógarbundin játtan) | 89.000 | 80.173 | | 8.827 |
| **Mentamál** | | | | |
| Mentamálaráðið (rakstrarjáttan) | 17.518 | 17.509 | | 9 |
| Studni (rakstrarjáttan) | 2.935 | 2.941 | 6 | |
| Útgerð til yrkisskúlar og hægri útbúgvingar (rakstrarjáttan) | 1.503 | 1.497 | | 6 |
| Skúlabókagerð (rakstrarjáttan) | 529 | 487 | | 42 |
| Vitin (rakstrarjáttan) | 12.725 | 12.720 | | 5 |
| Fjølrit (rakstrarjáttan) | 196 | 200 | 4 | |
| Próvtøkur (rakstrarjáttan) | 8.526 | 8.256 | | 270 |
| Næmingaheim (stuðulsjáttan) | 223 | 106 | | 117 |
| Fólkaskúlin (rakstrarjáttan) | 278.201 | 279.866 | 1.665 | |
| Sernámsdepilin (rakstrarjáttan) | 61.182 | 61.061 | | 121 |
| Stuðul til fólkaskúlar (stuðulsjáttan) | 6.606 | 6.073 | | 533 |
| Skúlatilboð til ung við breki (rakstrarjáttan) | 2.419 | 2.272 | | 147 |
| Miðnámsútbúgvingar (rakstrarjáttan) | 180.655 | 180.467 | | 188 |
| Skúladepil í Suðuroy (løgujáttan) | - | 2.333 | 2.333 | |
| Skúladepil í Marknagili (løgujáttan) | 23.000 | 22.997 | | 3 |
| Føroya fólkaháskúli (stuðulsjáttan) | 2.461 | 2.435 | | 26 |
| Húsarhaldsskúlar (stuðulsjáttan) | 2.188 | 2.156 | | 32 |
| Frítíðarundirvísing (rakstrarjáttan) | 6.036 | 5.891 | | 145 |
| Musikkskúlar (rakstrarjáttan) | 11.687 | 11.557 | | 130 |
| Maritimir skúlar (rakstrarjáttan) | 23.712 | 23.489 | | 223 |
| Fróðskaparsetur Føroya (rakstrarjáttan) | 67.478 | 67.452 | | 26 |
| Granskingarráð Føroya (rakstrarjáttan) | 2.499 | 2.314 | | 185 |
| ES-grannskingarskrá (stuðulsjáttan) | 6.920 | 6.927 | 7 | |

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Meirnýtsla | Minninýtsla |
|---|---|---|---|---|
| Lestrarstuðul (lógarbundin játtan) | 115.257 | 115.898 | 641 | |
| Lestrarlán (stuðulsjáttan) | 1.450 | 1.210 | | 240 |
| Tiltøk fyri børn og ung (stuðulsjáttan) | 0 | -2 | | 2 |
| Málnevndin (rakstrarjáttan) | 424 | 374 | | 50 |
| Orðabókagerð (rakstrarjáttan) | 940 | 910 | | 30 |
| Ymiskir studningar (stuðulsjáttan) | 2.448 | 2.416 | | 32 |
| Miðlaráð (rakstrarjáttan) | 355 | 343 | | 12 |
| Tónleikur og sangir (stuðulsáttan) | 1.800 | 1.775 | | 25 |
| Mentanargrunnurin (stuðulsjáttan) | 6.700 | 6.553 | | 147 |
| Umsiting av Mentanargrunninum (rakstrarjáttan) | 523 | 425 | | 98 |
| Leiklist (rakstrarjáttan) | 5.515 | 5.519 | 4 | |
| Norðurlandahúsið (stuðulsjáttan) | 1.300 | 1.264 | | 36 |
| Heiðursgávur til mentafólk (stuðulsjáttan) | 500 | 467 | | 33 |
| Søvn Landsins (rakstrarjáttan) | 22.532 | 23.177 | 645 | |
| Søvn Landsins (stuðulsjáttan) | 10.454 | 8.905 | | 1.549 |
| Listasøvn (rakstrarjáttan) | 2.320 | 2.348 | 28 | |
| Kirkjubømúrurin (løgujáttan) | 1.000 | 1.012 | 12 | |
| Kringvarp Føroya (rakstrarjáttan) | 0 | -30 | | 30 |
| Stuðul til framleiðslu av føroyskum loftmiðlatilfari (stuðulsjáttan) | 350 | 307 | | 43 |
| Ítróttahøll á Sandoynni (løgujáttan) | 2.000 | 1.999 | | 1 |
| Lánsafturgjald (stuðulsjáttan) | -100 | - | 100 | |
| **Heilsumál** | | | | |
| Heilsumálaráðið (rakstrarjáttan) | 10.791 | 10.351 | | 440 |
| Vísindasiðseminevndin (rakstrarjáttan) | 86 | 98 | 12 | |
| KT øki heilsuverksins (rakstrarjáttan) | 7.060 | 7.046 | | 14 |
| Upplýsing og ráðgeving (rakstrarjáttan) | 2.264 | 2.268 | 4 | |
| Koppsetingar (lógarbundin játtan) | 5.785 | 5.086 | | 699 |
| Upplýsing um gitnaðarfyribyrging (lógarbundin játtan) | 515 | 437 | | 78 |
| Heilsukanningar av barnakonum (lógarbundin játtan) | 760 | 750 | | 10 |
| Læknakanningar av børnum (lógarbundin játtan) | 920 | 701 | | 219 |
| Heilsutrygd (rakstrarjáttan) | 9.000 | 8.448 | | 552 |
| Heilsutrygdarveitingar (rakstrarjáttan) | 135.947 | 133.711 | | 2.236 |
| Kommunulæknaskipanin (rakstrarjáttan) | 11.333 | 11.109 | | 224 |
| Útbúgving av yngri læknum (rakstrarjáttan) | 5.916 | 5.024 | | 892 |
| Apoteksverkið (rakstrarjáttan) | 0 | 1.698 | 1.698 | |

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Meirnýtsla | Minninýtsla |
|---|---|---|---|---|
| Ílegusavnið (rakstrarjáttan) | 2.509 | 2.505 | | 4 |
| Landssjúkrahúsið (rakstrarjáttan) | 402.202 | 402.543 | 341 | |
| Medicoteknisk tól (løgujáttan) | 16.000 | 16.001 | 1 | |
| Klaksvíkar sjúkrahús (rakstrarjáttan) | 61.753 | 61.878 | 125 | |
| Suðuroyar sjúkrahús (rakstrarjáttan) | 49.001 | 49.306 | 305 | |
| Suðuroyar sjúkrahús (løgujáttan) | 2.500 | 2.498 | | 2 |
| Serviðgerð uttanlands (rakstrarjáttan) | 138.506 | 138.176 | | 330 |
| Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu (rakstrarjáttan) | 1.658 | 1.661 | 3 | |
| Viðgerðarstovnurin Heilbrigdi (rakstrarjáttan) | 4.996 | 5.017 | 21 | |
| Viðgerðarstovnurin Blákrossheimið (rakstrarjáttan) | 5.016 | 5.141 | 125 | |
| Gigni heilsufrøði fyri børn & ung (rakstrarjáttan) | 11.175 | 11.490 | 315 | |
| **Almannamál** | | | | |
| Almannamálaráðið (rakstrarjáttan) | 11.048 | 10.570 | | 478 |
| Viðlíkahald (rakstrarjáttan) | - | -3 | | 3 |
| Almannastovan (rakstrarjáttan) | 38.334 | 38.351 | 17 | |
| Hjálpartólamiðstøðin (rakstrarjáttan) | 7.581 | 7.337 | | 244 |
| Dugni-skúlin (rakstrarjáttan) | 3.348 | 3.266 | | 82 |
| Barnavernd (lógarbundin játtan) | 7.110 | 5.329 | | 1.781 |
| Einkjubarnastyrkur(lógarbundin játtan) | 1.976 | 1.896 | | 80 |
| Barnapeningur veittur í forskoti (lógarbundin játtan) | 2.417 | 2.387 | | 30 |
| Stuðul til uppihaldspening (lógarbundin játtan) | 9.192 | 7.547 | | 1.645 |
| Barnaískoyti (lógarbundin játtan) | 7.326 | 7.128 | | 198 |
| Børn og ung (rakstrarjáttan) | 44.768 | 42.771 | | 1.997 |
| Ættleiðingarstuðul (lógarbundin játtan) | 1.125 | 825 | | 300 |
| Dagpeningaskipanin (lógarbundin játtan) | 58.966 | 56.015 | | 2.951 |
| Serforsorg (rakstrarjáttan) | 168.991 | 164.852 | | 4.139 |
| Bústovnar o.a. (løgujáttan) | 23.000 | 22.433 | | 567 |
| Eldrarøkt (rakstrarjáttan) | 324.586 | 324.357 | | 229 |
| Nærverkið, Meginskrivstovan (rakstrarjáttan) | 7.180 | 7.153 | | 27 |
| Ansingarsamsýning (lógarbundin játtan) | 15.306 | 13.554 | | 1.752 |
| Vardar íbúðir, rakstrarstudningur (stuðulsjáttan) | 121 | 119 | | 2 |
| Serflutningsskipan landsins (stuðulsjáttan) | 947 | 847 | | 100 |
| Dugni-endurbúgving (rakstrarjáttan) | 6.099 | 6.091 | | 8 |
| Sjóndepilin (rakstrarjáttan) | 6.011 | 6.026 | 15 | |

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Meirnýtsla | Minninýtsla |
|---|---|---|---|---|
| Vanlig forsorg (lógarbundin játtan) | 148.545 | 137.703 | | 10.842 |
| Fólkapensjón (lógarbundin játtan) | 409.602 | 409.982 | 380 | |
| Fyritíðarpensjón (lógarbundin játtan) | 267.967 | 264.299 | | 3.668 |
| Umsorgararbeiði (stuðulsjáttan) | 2.806 | 2.771 | | 35 |
| Viðbót til ávísar pensjónistar (lógarbundin játtan) | 26.187 | 26.223 | 36 | |
| Námsfrøðingar í framhaldsútbúgving (rakstrarjáttan) | 291 | 285 | | 6 |
| **Innlendismál** | | | | |
| Landsins ognir (rakstrarjáttan) | -1.575 | -1.434 | 141 | |
| Innlendismálaráðið (rakstrarjáttan) | 15.515 | 14.106 | | 1.409 |
| Umvæling av almennum bygningum (løgujáttan) | 14.900 | 14.899 | | 1 |
| Lánsafturgjald (stuðulsjáttan) | -35 | -48 | | 13 |
| Ymiskar útreiðslur (rakstrarjáttan) | 1.232 | 846 | | 386 |
| Føroya Kærustovnur (rakstrarjáttan) | 5.220 | 5.177 | | 43 |
| Dátueftirlitið (rakstrarjáttan) | 1.984 | 1.980 | | 4 |
| Hin føroyski Happadrátturin (lógarbundin játtan) | -913 | -327 | 586 | |
| Hin føroyski Happadrátturin, fyrisiting (rakstrarjáttan) | 913 | 549 | | 364 |
| Stuðul til umhvørvisverndartiltøk (stuðulsjáttan) | 1.710 | 1.642 | | 68 |
| Náttúrufriðingarnevndir (rakstrarjáttan) | 316 | 293 | | 23 |
| Spilloljureinsing (stuðulsjáttan) | 2.800 | 2.785 | | 15 |
| Lánsafturgjald (stuðulsjáttan) | -3.400 | -3.498 | | 98 |
| Træplanting (stuðulsjáttan) | 250 | 232 | | 18 |
| Orkumál (løgujáttan) | 4.000 | 3.601 | | 399 |
| Landsverk (rakstrarjáttan) | 67.328 | 63.922 | | 3.406 |
| Nýggir landsvegir (løgujáttan) | 23.600 | 23.299 | | 301 |
| Havnir (løgujáttan) | 1.100 | 980 | | 120 |
| Stuðul til infrakervið á útoyggjum | 3.100 | 2.654 | | 446 |
| Akstovan (rakstrarjáttan) | -713 | -268 | 445 | |
| **Uttanríkismál** | | | | |
| Uttanríkistænastan (rakstrarjáttan) | 42.058 | 41.901 | | 157 |
| Millumtjóða samstarv (stuðulsjáttan) | 3.050 | 2.839 | | 211 |